# FÓTBÓLTUR KAPPINGARÁRIÐ 2023

**FSF** FÓTBÓLTSBLAÐIÐ

Hetta blað er ***ókeypis!***

FÓTBÓLTSSAMBAND FØROYA

#SAMAN**FRAMÁ**

Keyp ein Toyota - og fá ein 3 ára servicepakka

TOYOTA

# Ongar útreiðslur til viðlíkahald í 3 ár




TOYOTA
3
ÁRA SERVICE PAKKI

Tá tú keypir ein nýggjan Toyota, fært tú ein 3 ára servicepakka við í keypinum*. Ein Toyota 3 ára servicepakki fevnir um øll eftirlit, allar umvælingar, allar eykalutir og alt vanligt viðlíkahald**.

Støkk inn á gólvið í Havn ella Klaksvík, so kunnu vit vísa tær okkara nýggjastu bilar og greiða nærri frá 3 ára servicepakkanum.

**Tú fært nógvar fyrimunir við einum Toyota 3 ára servicepakka:**

- Ókeypis árligt og hálvárligt eftirlit
- Ókeypis umvælingar
- Ókeypis Toyota eykalutir
- Ókeypis viðlíkahald og skift av bremsum
- Ókeypis olja, løgir og skift
- Ókeypis perur og skift
- Ókeypis viskarar og skift
- Ókeypis sprinklaraløg og áfylling
- Ókeypis filtur og skift
- Ókeypis vask av bili ísv. eftirlit
- Ókeypis tøkniligar dagføringar
- Ókeypis bilhjálp í Evropa
- Hægri søluvirði á bilinum

*) Galdandi fyri allar nýggjar persónbilar. Servicepakkin er ikki galdandi fyri vørubilar og skúla- og hýruvognar.
**) Galdandi í 3 ár ella í mesta lagi til bilurin hevur koyrt 90.000 km.
Sí treytir á reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F
Tórshavn: Vegurin Langi 41, Hoyvík, Tel 35 30 40
Klaksvík: Klingrugarður 3, Tel 47 30 40




# Uppaftur meira fótbóltur í 2023



**Enn eitt kappingarár er um at byrjað, og spenningurin økist.**

Lat okkum taka samanum, fyrst við at hyggja eftir farna ári, og síðani hvat vit kunnu vænta í 2023.

Í fjør vóru 432 lið tilmeldaði í landskappingini, sum er nakað fleiri enn árið fyri. 290 lið vóru tilmeldað innan mansfótbólt og 142 lið innan kvinnufótbólt, og í ár sær út til, at luttøkan verður eitt lítið vet hægri.

Í Betri Deildini hjá monnum vann KÍ sera sannførandi meistaraheitið við 25 sigrum og tveimum javnleikum. Víkingur fór avstað við silvur, meðan HB vann bronsu.

Í Betri Deildini hjá kvinnum megnaði KÍ eisini at endurvinna meistaraheitið, meðan NSÍ gjørdist nummar 2 og HB nummar 3.

Og í steypakappingunum fingu vit tvær spennandi finalur, bæði hjá kvinnum og monnum. Hjá kvinnunum vann KÍ ein tepran 2-1 sigur á HB, og hjá monnum vann Víkingur 1-0 á klaksvíkingum.

Í finaluni um Løgmanssteypið – framman fyri fleiri enn 4.000 áskoðarum – var tað ikki fyrr enn seint í dystinum at alt varð avgjørt við brotssparki, sum Sølvi Vatnhamar setti í netið.

Spurningurin er so, hvør vinnur kappingina í ár, og verða nýggj met sett? Alt er opið og alt kann henda. Tað er júst hetta sum ger kappingina spennandi.

Tað er okkara vón, at vit fáa tvær minst líka spennandi finalur aftur í ár, og at finaluliðini veruliga gera hendan dagin til sín egna dag við øllum tí, sum har til hoyrir.

Í fjør luttóku fýra føroysk lið, KÍ, HB, Víkingur og B36, í Evropeisku kappingunum hjá monnum, umframt KÍ hjá kvinnum.

Úrslitini í 2022 vóru sum heild góð, og mannsliðið hjá KÍ var nær við at røkka bólkaspælinum í UEFA Conference Leauge.

Tað hevur ómetaliga stóran týdning fyri Føroyar, at føroysk lið fáa góð úrslit í evropeisku kappingunum, og vit skulu gera alt fyri at varðveita tey fýra plássini, sum vit hava í løtuni.

Sæð við landsliðsbrillum, hilnaðiast farna kappingarár eisini væl. Menninir stóðu seg væl í UEFA Nations League, við millum annað einum góðum sigri á Turkalandi. Føroyar endaðu nummar 3 í bólkinum, ájavnt við Luksemborg, sum gjørdist nummar 2.

Kvinnulandsliðið var í einum sterkum HM-undankappingarbólki, men framgongdin var at hóma, samstundis sum úrslitini í Baltic Cup og í venjingardystunum vóru sera góð, við sigrum á Lettlandi, Andorra og Gibraltar.

Í ár verður landsliðsárið minst líka umfatandi, og sum nakað nýtt skulu kvinnurnar nú spæla UEFA Nations League. Ein kappingarleistur, ið passar okkum væl, og spennandi verður at fylgja við, tá lutakastið verður í mai mánað.

Hjá monnum eru tíggju dystir á skránni – 8 EM-undankappingardystir, og tveir venjingardystir, sum vera ímóti Norðurmakedónia og Noregi.

Í fjør tók FSF avgerð um at víðka landsliðsvirksemið, til eisini at hava U16-landslið við bæði gentum og dreingjum. Endamálið er at økja um tilboðið hjá hesum ungu spælarunum, so tey kunnu fáa fleiri landsdystir, samstundis sum tey mennast sum fótbóltsspælarar.

FSF arbeiðir miðvíst við at menna gentu- og kvinnufótbóltin, og í ár vera vit vertir fyri UEFA Share seminari, har evnið verður kvinnufótbóltur.

Mítt hjartamál hevur altíð verið, at vit skulu fáa fleiri børn og ung at spæla fótbólt, samstundis sum tey eisini skulu trívast og mennast. Tað er tískil sera týdningarmikið, at tey hava góðar umstøður, við góðum venjarum, og vit fegnast tí yvir, at FSF hevur møguleikan at stuðla hesari menning, so vit eisini í framtíðini kunnu geva teimum ungu dygdargóðar venjingar.

Eg eri sannførdur um, at føroyingar í 2023 fara at fáa nógvar og góðar upplivingar á øllum stigum innan føroyskan fótbólt, ið samstundis fer at gera okkum errin av, at vit eru føroyingar.

***Við hesum orðum fari eg at ynskja øllum eitt gott kappingarár***

**Christian F. Andreasen**
*FSF-forseti*

**www.fsf.fo**

**FSF FÓTBÓLTSBLAÐIÐ 2023**
**Útgevari:** Fótbóltssamband Føroya **Ábyrgd:** Hans Erik Danielsen / FSF
**Tekstur:** Maria Ziskason, Terji Nielsen, Tróndur Arge, Símun Christian Olsen, Niels Petersen, Heðin Arge og Hans Erik Danielsen
**Myndir:** Hans Erik Danielsen, Bjarni Enghamar o.o. **Grafiskt snið:** Pætur Eyðunsson Jensen **Prent:** TrykNet



# VILJA HAVA FRIÐ AT BYGGJA UPP

*Steðgurin hjá skálamonnum í Betri Deildini gjørdist stuttur – aftur hesaferð. Skála er skjótt vorðið ímyndin av einum elevatorliði, sum flytur upp og niður*

MEN TEY Á SKÁLA fara ikki í panikk. Tey eru púra rólig.

Tað var eitt ungt og lokalt lið, sum í fjør endaði aftast í Betri Deildini hjá monnum. Saman við teimum mongu lokalu leikarunum hevði Skála fingið styrk úr Fuglafirði, haðani málverjin, Jákup Nolsøe Olsen, Steinbjørn Olsen og Emil Weihe vóru komnir.

Síðani var eisini eitt kent útlendskt andlit aftur at síggja í føroyskum fótbólti, Vukasin Tomic. Hann hevur áður roynt seg í Víkingi, og í fjør sendi Skála boð eftir honum. Hóast unga lokala liðið, við eitt sindur av styrki, vísti gott spæl til tíðir, so gjørdist skjótt greitt at, Skála heldur ikki hesaferð fór at yvirliva í bestu deildini.

Vit ætla okkum sjálvandi uppaftur. Soleiðis sigur formaðurin, Ingi Hansen, og leggur afturat: "Fótbóltur er so nógv meira enn bara at vinna. Vit skulu eisini menna okkara egnu leikarar".

Men fyri Inga og hini, ið eru kring felagið – bæði leikarar, nevnd og fjepparar – er nokk ongin ivi um, at í ár er tað dysturin móti vespunum hinumegin fjørðin, sum skal vinnast.






*Ingi Hansen, formaður*

### FRIÐ AT BYGGJA UPP

Stóra stjørnan á liðnum í fjør var Poul Kallsberg, men hann verður ikki at síggja í appilsingulu troyggjuni í 2023. Hann hevur skift til ljósablátt og Víking.

Tað harmar sjálvandi formannin, at ein so evnaríkur leikari velur annað felag.

– Vit ynskja at byggja upp við lokalum leikarum. Men eg vildi ynskt at vit fingu meiri frið til at byggja upp, tí sum støðan er nú, so er tað ov lætt hjá teimum "stóru" at fara avstað við teimum evnaríkastu leikarunum hjá teimum smærru feløgunum.

Hann vísir á, at tað er torført hjá teimum smáu feløgunum at byggja nakað veruligt upp, tá størru feløgini lættliga kunnu fara avstað við teimum bestu ungu leikarunum.

### KENDUR MAÐUR SKAL BYGGJA UPP

Pauli Poulsen. Navnið á manninum, sum skal venja Skála í ár. Hetta er eisini navnið á manninum, sum fyrr hevur staðið á odda fyri besta mansliðnum á eystara armi á Skálafjørðinum, og hann veit tí væl, hvat hann kemur til, og hvør uppgávan er.

> **"Vit ynskja at byggja upp við lokalum leikarum. Men eg vildi ynskt at vit fingu meiri frið til at byggja upp"**

Pauli var venjari hjá Skála frá 2014 til 2017, tá hann bygdi eitt ungt lokalt lið upp. Tað tíðarskeiðið ferðaðist liðið eisini millum bestu og næstbestu deildini, men í 2016 og 2017 megnaði Skála at halda seg uppi í bestu deildini.

– Pauli er væl skipaður. Og júst tað hóskar sera væl saman við teimum ungu leikarunum, sum eru áveg fram. Fyri okkum er hann júst rætti maðurin at byggja hetta liðið upp, sigur formaðurin, Ingi Hansen, sum leggur afturat, at hóast teir byggja upp við lokalum leikarum, so er ikki óhugsandi, at onkur styrkur kemur til liðið.

– Vit eru sjálvandi opnir fyri at styrkja liðið, men tað skal hanga saman fíggjarliga. Tað kann ikki fara meir úr kassanum, enn tað kemur í kassan.

Skála hevur longu fingið ein sterkan aftasta skansa. Karstin Hansen, sum bert fyri fáum árum síðani var aktuellur til landsliðið, er aftur hjá teimum appelsingulu, har hann var fastur maður í 2018 og 2019.

– Vit ætla okkum uppaftur – lat ongan iva vera um tað. Sjálvandi ætla vit tað, sigur Ingi at enda.

Skála skal í ár kappast við grannarnar úr NSÍ, B71 og FC Hoyvík um at flyta upp í bestu deildina.




FÓTBÓLTSSAMBAND FØROYA
www.fsf.fo

# HVÍTU TIKARARNIR BJÓÐA AV

*4. pláss. Tað var plássið, ið bæði kvinnurnar og menninir hjá B36 endaðu á í fjør. Hjá báðum var talan um eina framgongd í mun til 2021. Men hóast tað, so vóru tey neyvan nøgd í B36 húsinum*

**AT FREMSTA MANSLIÐ** hjá B36 gjørdist nummar 4, tá kappingin endaði í fjør, var hóast alt sera kærkomið fyri árstalsfelagið í høvuðsstaðnum. Tað gav tikarunum nevniliga atgongd til lovaða landið – Evropeiskan fótbólt í 2023. Landið, ið gevur nakrar spennandi avbjóðingar, og sum kann gera, at felagið verður lokkandi at spæla fyri.

Hóast B36 aftur tryggaði sær evropeiska luttøku, so vóru teir í veruleikanum nærri einum fimta plássi enn einum bronsuheiðursmerki. Avrikini vóru ov óstøðug, og teir hvítu og svørtu endaðu heili 17 stig aftanfyri reyðsvørtu grannarnar.

– Tá man endar nærri einum fimta plássi enn einum triðja plássi, so eru tað nógv viðurskifti, ið skulu gerast betri. Vit skulu millum annað hækka botnstøðið, tí avrikini vóru ov svingandi í fjør. Harafturat skulu vit skjóta fleiri mál, og hetta er nakað, sum vit arbeiða uppá, sigur Dan Brimsvík, sum aftur í ár er venjari hjá fremsta mansliðnum hjá B36.



Dan Brimsvík, venjari




*Brá Zachariasardóttir, B36*

Tað ljóðar sum ein einføld uppskrift, men Dan og hansara menn hava seinastu árini lagt nógva orku í at byggja liðið upp av nýggjum.

– Vit hava brúkt tvey ár at byggja liðið upp. Hetta hevur eydnast, og vit hava spennandi ungar leikarar í hópinum. Harafturat hava vit ment nakrar av okkara egnu til landsliðsleikarar, greiðir Dan Brimsvík frá.

## ERU KLÁRIR AT KAPPAST UM HEIÐURSMERKIR

Serfrøðingar settu í fjør fleiri ferðir spurnartekin við avrikini hjá B36, og hildu, at manningin hjá teimum var sterkari enn úrslitini vístu. Tí var tað fyri summi eitt vónbrot, at B36 ikki stóð seg betri. Men sambært venjaranum eru teir klárir til at stríðast um heiðursmerki.

– Tit skulu vænta eina sterkari útgávu av B36 í 2023. Vit ætla okkum at kappast um tey fremstu plássini, og vónandi standa vit eftir við einum heiðursmerki. Í fjør høvdu vit tað yngsta liðið av toppliðunum, men tær royndirnar, sum leikararnir fingu, fara væntandi at koma okkum til góðar nú. Samstundis hava vit fingið nakrar dugnaligar leikarar í hópin, sigur ein spentur Dan Brimsvík at enda.

***“Tit skulu vænta eina sterkari útgávu av B36 í 2023. Vit ætla okkum at kappast um tey fremstu plássini”***

## BRÁ FER AT DANSA SAMBA Í B36

Eins og menninir, so endaðu kvinnurnar hjá árstalsfelagnum eisini á 4. plássi í fjør. Tummas Erling Djurhuus stendur aftur í ár á odda fyri besta kvinnuliðnum hjá B36, og hóast tær endaðu nummar fýra farna kappingarár, so kunnu vit helst vænta meira av teimum í ár.

Í fjør royndi B36 nakað nýtt. Tveir útlenskir leikarar vóru knýttir at hópinum hjá kvinnunum. Livyan Borges Silva og Jiselle Lacerda úr Brasil vóru tveir av lyklaleikarunum hjá hvítklædda liðnum. Í ár hava tær fingið enn ein leikara úr Brasil – Stefani Cabral. Hon skeyt 16 mál fyri NSÍ í fjør, men í ár skal hon skjóta mál fyri B36.

Umframt Cabral, hevur B36 eisini tryggjað sær ein av evnaríkastu ungu leikarunum í landinum. Brá Zachariasardóttir, sum hevur spælt ungdómsfótbólt í FC Hoyvík, hevur skift felag, og í ár verður heimavøllurin hjá henni í Gundadali.

Unga stjørnuskotið vísti síni kynstur í millum annað steypafinaluni fyri U16 í fjør, har hon skoraði eitt av flottastu málunum í 2022.

Hóast hon enn er sera ung, so fer hon helst at fáa ein leiklut á B36 liðnum, har hon, saman við Cabral, Livyan Borges og hinum skal skjóta mál. Og væntandi verða tær hvítu og svørtu partur av einum spennandi oddastríðið í Betri Deildini hjá kvinnum í 2023.





# VÍKINGUR HEVUR VÍST VEGIN

*Herfyri vann Víkingur heiðurin sum ársins ítróttarfelagsskapur í sambandi við ítróttarfagnaðin hjá ÍSF. Ein av grundgevingunum var, at Víkingur hevur víst, at man við miðvísum og málrættaðum arbeiði kann røkka langt við lokalum kreftum*

**ÁRIÐ Í FJØR HEPNAÐIST** sera væl hjá Víkingi í Betri Deildini hjá monnum, har liðið endaði næstfremst og í veruleikanum var einasta liðið, ið veruliga bjóðaði føroyameistarunum úr KÍ av í innanhýsis dystunum. Harumframt vann felagið eisini kappingina um Løgmanssteyið við einum 1-0 sigri á júst KÍ í finaluni.

**LOKALIR OG UNGIR**

Tað, ið hevur hugtikið tey flestu í sambandi við góðu úrslitini hjá Víkingi, er, at liðið so at siga burturav er mannað við lokalum leikarum, og í stóran mun rættiliga ungum leikarum. Olaf Bárðarson, Noah Mneney, Geza David Turi, Ingi Jonhardsson, Martin Klein Joensen og Arnbjørn




***"Fyrst og fremst er tað ein góð blanding av dugnligum leikarum, og vit hava rakt nakrar góðar árgangir"***





*Jensa Tórolvsdóttir*

Svensson eru bert nakrir úr rúgvuni av teimum ungu, ið allir hava havt týðandi leiklut á besta liðnum hjá Víkingi seinastu árini.

Teir spældu nøkur fá ár sum blaðungir á næstbesta liðnum hjá felagnum í 1. Deild og fingu sera góð úrslit har, og tað var við Jóhan Petur Poulsen sum venjara.

Sami Jóhan Petur Poulsen gjørdist seint í kappingarárinum 2020 venjari hjá besta liðnum hjá felagnum, og tann broytingin hevði við sær, at fleiri og fleiri av teimum ungu á næstbesta liðnum blivu fluttir upp á besta liðið.

Fyri nógv tóktist hetta at vera eitt stórt sats, men tíðin hevur víst, at hetta var ein skilagóð avgerð, tí liðið bleiv bara sterkari, og farna kappingarár vunnu teir ljósabláu víkingarnir gull í steypakappingini.

## FELAGSKENSLAN HEVUR BORIÐ FRAMGONGDINA

Ein av teimum, sum hevur verið við øll árini, síðani Víkingur bleiv stovnað í januar í 2008, er liðskiparin á besta mansliðnum, Atli Gregersen. Og hann er ikki í iva, tá ið hann verður spurdur, hvussu tað ber til, at tað hevur hepnast so væl við egnum tilfeingi hjá felagnum.

– Tað eru sjálvandi nógvir faktorar, sum spæla inn, og fyrst og fremst er tað ein góð blanding av dugnligum leikarum, og vit hava rakt nakrar góðar árgangir, sigur hann.

Tá ið GÍ og LÍF løgdu saman og blivu til Víking, gekk man somuleiðis høgt uppí, at man ikki niðurraðfesti liðið í næstbestu deildini, og tað heldur Atli Gregersen vera sera umráðandi.

– Næstbesta liðið spælir í Leirvík, og teir hava góðar umstøður har. Tað hevur eisini verið so, at ungir leikarar í felagnum tíðliga sleppa at royna seg á næstbesta liðnum, og eg haldi, at tað hevur havt stóran týdning, sigur hann.

Atli Gregersen greiðir frá, at tað møta eisini nógv fólk til dystirnar hjá næstbesta liðnum, og tað hevur stimbrað upp undir hugin hjá ungu leikarunum.

– Hugburðurin millum teir ungu hevur eisini verið, at man vil leggja nógv í fótbóltin, og tá ið liðið blívur so lokalt, sum tað er her hjá okkum, so verður tað eisini í nógv størri mun góðtikið av áskoðarunum, at man ikki altíð er á tindunum, sigur hann.

*“Felagið leggur eisini stóran dent á, at vit hava eitt gott ungdómsarbeiði”*

Til kappingarárið í ár hevur besta liðið hjá felagnum eisini mist tveir av grundstuðlunum á liðnum í Bárði Jógvansson Hansen, ið er givin, meðan Noah Mneney, ið júst hevur spælt sín fyrsta dyst á A-landsliðnum, er seldur til norska felagið Bryne FK.

Men hóast her er talan um tveir berandi leikarar, so ger felagið ikki tað, sum flestu onnur feløg ivaleyst høvdu gjørt, nevnliga at fara út at leita eftir avloysarum fyri teir báðar. Sambært Atla Gregersen verða tað ungir lokalir leikarar, sum skulu fylla holini eftir teir báðar.

– Felagið leggur eisini stóran dent á, at vit hava eitt gott ungdómsarbeiði, og í tí sambandi vil man fegin hava, at tað er rúm fyri ungu leikarunum á liðnum, og tí vera tað væntandi onkur av teimum ungu, ið tekur yvir, sigur liðskiparin hjá Víkingi.

## EISINI GÓÐ BREIDD HJÁ KVINNUNUM

Tað er ikki bara á manssíðuni, at Víkingur stendur seg væl. Eisini kvinnurnar hava í nógv ár bjóða av, og felagið hevur lið bæði í bestu og næstbestu deildini.

At nógvir góðir kvinnuligir leikarar eru í Víkingi sæst til dømis aftur í, at tá ið føroyska kvinnulandsliðið seinast spældi landsdyst á heimavølli á heysti í fjør, vóru ikki færri enn tríggjar leikarar úr Víkingi millum tær fyrstu ellivu.

## PROFILUR SKIFTIR TIL DANSKAN TOPPFÓTBÓLT

Ein av hesum trimum, Jensa Tórolvsdóttir, hevur undan hesum kappingarárinum skift til danskan fótbólti, har hon nú skal royna seg í FC Thy í bestu donsku kappingini. So felagið hevur ikki bert á manssíðuni megnað at ala fram evnaríkar leikarar, tí millum annað Jensa hevur í fleiri ár verið ein av mest eyðsýndu leikarunum í føroyskum kvinnufótbólti.

At tær ljósabláu so eisini megna at manna tvey kvinnulið í mun til onnur feløg í landinum, sum hava avbjóðingar við at manna bara eitt kvinnulið, so sigur tað eisini eitt sindur um tað breidd, sum er í felagnum.

Havast skal eisini í huga, at meðan fleiri av hinum liðunum í fremstu kvinnudeildini seinnu árini hava fingið tilgongd av útlendskum leikarum, so hevur Víkingur hildið fast í lokala leistinum, sum hevur verið eyðkenni hjá felagnum í fleiri ár.





# TB ER AFTUR MILLUM TEY BESTU

*Aldursforsetin í føroyskum fótbólti, TB er aftur at finna millum bestu liðini í landinum. Sessin í fremstu deildini vunnu teir sær við einum 3. plássi í 1. deild farna kappingarár*

**EFTIR EINA HELDUR** trilvandi byrjan tryggjaðu tvøramenn sær rættin til Betri Deildina í ár, og grundarlagið varð serliga lagt við einari imponerandi sigursrøð í 11 dystir. Talan var mangan um ferðmikið og álopskent fótbóltspæl, og tað var ein ordans sigursbylgja sum TB reið á. Tey flestu vóru mest sum á einum máli um, at nú fór TB at kveistra alla mótstøðu av vegnum.

Men so kom heldur óvæntað stígur í, og spenningur kom aftur í stríðið um uppflytingina. Tað eydnaðist tó ungu tvøramonnunum at røkka málinum, og sostatt er fótbóltur aftur í besti deildini í Suðuroynni.

Mong spyrja ivaleyst, hvat vit kunnu vænta okkum av einum ungum TB liði, har nakrir av ungu leikarunum ikki hava stórvegis royndir frá fótbólti í bestu deildini. Og mong tvørafólk vita ikki reiðiliga heldur, hvat man kann loyva sær at vænta. Men ungu tvøradreingirnir, Jens Erik Bruhn og Nikolei Johannesen eru púra greiðir yvir avbjóðingarnar sum liggja fyri framman.



**"Størsta gávan leikararnir kunnu geva okkum, er at vit ikki enda á 9. ella 10. plássi"**



André Dalfoss, formaður



Jens Erik Bruhn, TB





Nikolei Johannesen, TB

Jens Erik metir TB hava møguleika at halda sær í deildini.

– Eg meti at vit hava ein spennandi hóp, og eg eri vónríkur um kappingarárið fyri framman, sigur fryntligi TB leikarin.

Umframt Jens Erik Bruhn, so er sevmýrisingurin, Nikolei Johannesen eisini ein av ungu leikararnir við flestum royndum, og við 7 málum frá miðvallarplássi farna kappingarár, hevur Nikolei longu víst seg sum ein av lyklaleikarunum hjá TB.

Umframt hesar báðar og Einar Thorsteinsson, eru fleiri ungir leikarar sum hava fingið fótin innum á U17 og U19 landsliðunum, og tí verður spennandi at síggja hvussu fer at gangast teimum.

Tað er nakað heilt serligt at umboða sítt barndómsfelag og sín heimbý, og hesa kensluna tykist Nikolei vera fullgreiður yvir.

**„Løgin, men eisini ein góð kensla, at vera 21 ár og vera ein av teimum eldru"**

– Tað er ein løgin, men eisini ein góð kensla, at vera 21 ár og vera ein av teimum eldru, sum teir yngru kunnu lena seg uppat. Hetta læri eg eisini nógv av sjálvur, sigur evnaríki miðvallarin, hvørs bæði pápi, beiggi og pápabeiggi hava verið landsliðsleikarar.

Tað eru serliga nógvir ungir tvøradreingir í hópinum í ár, og tað er gleðast um.

– Vit hava eina rúgvu av ungum lokalum kreftum í hópinum, og tað er ordiliga stuttligt at síggja. Og eg føli eina ábyrgd á mær, og stoltleika í at umboða býin og fólkið sum eg eri uppvaksin saman við. Eg byrjaði á Sevmýri og seinni inni við Stórá, og droymdi altíð um sjálvur at sleppa at umboða TB á besta liðnum. Tað er nakað heilt serligt, sigur ein errin Nikolei.

Í fyrsta venjingardystinum í ár vann TB herfyri sannførandi á B71, og arbeitt verður í løtuni dúgliga við fyrireikingunum til komandi kappingarár. Onkur eldri leikari er byrjaður at venja við aftur, og sum heild sær tað áhugavert út á Tvøroyri í løtuni.

Nýggjur formaður er nú í Tvøroyrar Bóltfelag, og hann hevur roynt hetta fyrr. André Dalfoss, sum sat sum formaður frá 2011 til 2013 stendur nú aftur við róðrið í TB, og sambært honum, so kunnu vit vænta at síggja eitt hartarbeiðandi lið av ungum monnum og eldri royndum leikarum, og hann sigur seg gleða seg til at síggja barndómsfelagið umboðað í bestu deildini aftur.

TB hevur verið umboðað av nógvum útlendskum leikarum síðstu árini, men sambært nýggja formanninum, so verður tað broytt framyvir.

– Ætlanin er, at talið av útlendskum leikarum verður skert so vítt møguligt, men heilt uttan útlendskan styrk sleppa vit ikki, sigur formaðurin.

Andre Dalfoss er á øðrum sinni í formanssessinum hjá Tvøroyrar Bóltfelag, og sambært honum, so tað ein æra at røkta henda sessin.

– Eftir fleiri áheitanir, játtaði eg at stilla upp til formansvalið sum var á eykaaðalfundi felagsins 27. desember í fjør. Og eg føli meg motiveraðan av at síggja allar teir ungu leikararnir, sum nú eisini verða stuðlaðir av eldri og royndari leikarum. Eg kundi ikki gera annað enn at játta, sigur ein spentur og vónríkur formaðurin.





# FARA AFTUR Í ÁR EFTIR GULLINUM

*Tað hevur regnað við gullið á Djúpumýru seinastu árini. Bæði kvinnurnar og menninir vóru aftur í fjør á ovastu rók. Kvinnurnar vunnu greipuna, og menninir vunnu sannførandi føroyameistaraheitið, uttan at tapa nakran dyst*

**HÓAST ÚTLITINI** fyri kappingarárinum 2023 eru góð í Klaksvík og fyri tey, ið standa kongabláa felagnum nær, so verður tað uttan teir báðar venjararnar, sum í fjør stóðu á odda fyri ávikavist kvinnum og monnum, og sum samanlagt vunnu trý gull og eina silvur til stolta fótbóltsfelagið hjá norðoyingum. Mikkjal Kjartansson Thomassen valdi, eftir 8 ár í Klaksvík, at royna seg sum venjara í Fredrikstad, sum spælir í næst bestu deildini í Noregi. Eisini Jonas Wedeborg, sum fyri fyrstu ferð stóð á odda fyri kvinnuliðnum hjá KÍ, valdi at takka fyri seg á Djúpumýru, og vendi aftur til Svøríki, har hann nú venur Kalmar í bestu svensku deildini.





*Tummas Lervig, formaður*

Nevndin í KÍ brúkti tó ikki langa tíð at fáa venjaraspurningarnar avgreiddar. Fyrrverandi høvuðsungdómsvenjarin í MB, Kristoffer Kvistgaard, er settur sum høvuðsvenjari hjá kvinnunum, og skal royna at endurvinna greipuna. Og maðurin, sum skal lyfta arvin eftir Mikkjal Thomassen, ið helst hevur fingið legendu-status í Klaksvík, er Magne Hoseth.

Norðmaðurin hevur roynt nógv sum yrkisleikari, men hevur ongar royndir sum høvuðsvenjari.

Hóast útskifting og nýggjar stýrimenn, so er formaðurin í felagnum, Tummas Lervig, ikki í iva:

Gullheiðursmerkini skulu aftur til Klaksvíkar.

– Sjálvandi fara vit eftir at endurvinna gull hjá bæði kvinnum og monnum. Men vit ynskja at gerast betri til alt. Vit vilja at liðini hjá okkum spæla góðan fótbólt, og at KÍ sum felag skal gerast betri á øllum økjum, sigur Tummas Lervig, sum hevur verið formaður í KÍ síðani 2008.

## DROYMA FRAMVEGIS STÓRT

Evropeiskt bólkaspæl. Tað er nakað, ið nógv hevur verið tosað um í Klaksvík og í KÍ. Men hóast Mikkjal ikki longur er venjari, so eru ambitiónirnar framvegis tær somu.

– Tað er bara ein spurningur um tíð, áðrenn eitt føroyskt felag kemur í eitt evropeiskt bólkaspæl. Og vit vilja verða teir fyrstu, sum gera tað. Vit vóru so sera nær við í fjør, so vit vita at tað manglar ikki nógv í, sigur Tummas Lervig, og leggur afturat, at nýggi venjarin ikki skal stúra fyri starvinum, um teir ikki vinna gull í ár ella ikki megna at koma í eitt bólkaspæl.

– Vit ynskja stabilitet. Tá Mikkjal kom, settu vit okkum sum mál at koma í topp fýra, men fyrsta árið endaðu vit nummar fimm. Vit hildu fram, tí vit ynsktu stabilitet og hetta er eisini galdandi fyri nýggja venjaran.



*Rebekka Benbakoura, KÍ*

***"Tað hevði verið feitt, um vit høvdu kunnað klárað okkum betur í Champions League enn áður"***

## BENBAKOURA Í KONGABLÁUM

Kvinnurnar hjá KÍ vóru aftur í fjør sannførandi. Tær hava gjørt tað so ofta fyrr, og flestu leikararnir kenna ikki til annað enn at vinna, og sum oftast standa tær eftir við gullinum, tá heiðursmerki verða býtt út.

Ein, sum ikki er líka von at vinna, er Rebekka Benbakoura, ið hevur fingið sín fótbóltsuppvøkstur í HB. Í ár hevur hon tó tikið avgerð um at royna okkurt annað, og í 2023 verður heimavøllurin hjá henni ikki í Gundadali, men á Djúpumýru í Klaksvík.

– Eg haldi, at man viðhvørt hevur brúk fyri at royna aðra luft, tá man hevur verið onkrastaðni í nógv ár. Hetta er eisini aktuelt í samband við, hví eg gjørdi av at skifta til KÍ. KÍ er eisini eitt felag, ið er sera seriøst og hevur stór mál, ið tey arbeiða miðvíst eftir, og tí vildi eg gjarna vera ein partur av, sigur Rebekka Benbakoura.

Rebekka hevur framvegis sítt fyrsta føroyameistaraheiti til góðar, men í 2019 var hon við til at vinna steypakappingina við HB.

– Málið er, at fáa so nógvar minuttir sum gjørligt og hjálpa liðnum sum best ber til, men sjálvandi er málið eisini, at varðveita "the double" og so hevði tað verið feitt, um vit høvdu kunnað klárað okkum betur í Champions League enn áður, sigur Rebekka.

Orsaka av skaða spældi Rebekka Benbakoura ongan dyst í fremstu deildini í 2020 og í 2021, men í fjør var hon aftur at síggja á vøllinum, og evnini eru eyðsýnd. Landsliðsvenjarin lá ikki leingi á boðunum, men sendi skjótt boð eftir ungu havnadamuni.

Rebekka fer, saman við hinum á KÍ liðnum, eftir at vinna fimta føroyameistaraheitið á rað.





ÍTRÓTTADEPILIN
VIÐ DJÚPUMÝRI FO-700 KLAKSVÍK FØROYAR ITROTTADEPILIN@KLAKSVIK.FO ITROTTADEPILIN.FO

# GULLVENJARIN SKAL BYGGJA UPP AV NÝGGJUM

*Árið í fjør kundi verið árið, tá mansliðið hjá EB/Streymi aftur sníkti seg fram ímillum tey fremstu. Teir vóru bara trý stig frá B36, sum endaði nummar 4. Liðið er í framgongd, og í ár verður tað við nýggjan manni við stýrisvølin, nú venjarin seinastu fýra árini hevur tikið við øðrum avbjóðingum*

**EIÐISMAÐURIN Í HAVN,** Jákup Martin Joensen hevur nú takkað fyri seg sum venjari hjá EB/Streymi, og hevur tikið við nýggjari avbjóðing í HB, har hann skal vera hjálparvenjari hjá Dalibor Savic.

Men tað er ikki hvør sum helst, ið nú er komin í venjarasessin hjá sundalagsmonnum. Talan er um ein mann, ið hevur drúgvar royndir sum venjari, og seinast, hann stóð við ábyrgdini hjá EB/Streymi, vunnu teir bæði føroyameistaraheiti og Løgmanssteypið.

– Tað kennist gott at vera aftur í EB/Streymi. Tey hava tikið væl ímóti mær. Samstundis er tað deiligt at vera aftur á vøllinum, og eg gleði meg til uppgávuna, sigur Sigfríður







Skaale Clementsen, sum ikki hevur verið venjari í bestu deildini síðani 2018, tá hann var venjari í Víkingi.

Hann hevur tó ikki verið langt burtur frá fótbóltinum, tí seinastu árini hevur Sigfríður arbeitt sum fótbóltsmennari hjá FSF, og verið venjari hjá U19-landsliðnum við dreingjum.

Tað verður tó ikki væntandi í ár, at EB/Streymur og Sigfríður fara at kappast um gullið. Árið í fjør eydnaðist væl, men felagið hevur mist nakrar týðandi leikarar. Royndi málverjin, Kristian Joensen er farin til NSÍ, Jay Andersen heldur ikki fram í felagnum, og Jóhann Joensen er farin til 07 Vestur. Samstundis hevur lokali Rói Olsen fyribils takkað fyri seg í sundalagnum.

Hinvegin eru komnir tveir ungir leikarar úr B36 og Víkingi. 20 ára gamli Markus Hellisdal hevur skift 1. deildarfótbólt í árstalsfelagnum í Havn út við besta liðið hjá EB/Streymi. Tað sama hevur Rani Hansen gjørt, sum í fjør skoraði 12 mál fyri næstbesta liðið hjá Víkingi.

– Hetta er ein heilt øðrvísi uppgáva í mun til seinast, tá eg var í EB/Streymi. Uppgávan hjá mær hesaferð verður fyrst og fremst at spæla nýggjar ungar leikarar inn á liðið. Hetta er eitt lið, sum ikki hevur tær stóru royndirnar. Vit hava sjálvandi nakrar, sum vita hvat krevst, og sum eisini hava stóran týdning fyri liðið. Dánjal Godtfred, Rógvi Egilstoft og Bogi Reinert-Petersen eru royndir leikarar, men fáa vit skaðar, so er hópurin øgiliga tunnur, greiðir Sigfríður frá.

> **“Uppgávan hjá mær hesaferð verður fyrst og fremst at spæla nýggjar ungar leikarar inn á liðið”**

## KVINNURNAR EISINI NÝGGJAN VENJARA

Seinastu tvey árini hevur Símun Eliasen staðið á odda fyri kvinnunum hjá felagsliðnum, ið EB/Streymur og Skála hava samstarvað um síðani 2013.

Fyri tveimum árum síðani endaðu tær á einum 3. plássi, og fjør endaðu tær nummar 6 av teimum átta liðunum í Betri Deildini hjá kvinnum.

Farna kappingarár sá annars leingi gott út hjá sundalags- og skálakvinnum, tí tá ein triðingur var spældur av kappingini, var EB/Streymur/Skála nummar tvey á stigatalvuni. Men síðstu tveir triðingarnar vunnu tær bara tríggjar dystir, og tað gjørdi, at liðið endaði árið við bara 28 stigum, ájavnt við Víking, sum bleiv nummar 5.

Símun Eliasen heldur ikki fram sum venjari, og tí verður tað nýggjur venjari, ið skal fáa felagsliðið aftur á toppin, har tær vóru í 2017 og 2018, tá EB/Streymur/Skála tvey ár á rað vann greipuna.

Hóast úrslitið í fjør ikki var júst tað, ið tær á felagsliðnum vónaðu og møguliga væntaðu, so verður tað ein spennandi uppgáva hjá nýggja venjaranum. Tí bæði á Skála og í sundalagnum eru fleiri ungir og evnaríkir leikarar ávegis, samstundis sum liðið hevur havt royndar profilar í hópinum.






Vit ynskja EB/Streymi
eitt gott kappingarár

SUNDA KOMMUNA

sunda.fo

# VIL RØKKA ØLLUM

*Miðvágs Bóltfelag varð sett á stovn í 1905, og er sostatt eitt av elstu feløgunum í landinum. Felagið er eisini eitt av smæstu í landinum, og besta lið felagsins spælir í 2. deild. Tað er í løtuni bert eitt vaksnamannalið hjá MB, og tað er besta manslíðið. Annars hevur felagið rímiliga nógv ung og børn sum aktivar limir, og sambært forkvinnuni, Elisabeth Haraldsen, so er tað her tað eigur at verða sett inn fyrst og fremst*

**ELISABETH HARALDSEN** hevur sitið sum forkvinna í MB síðan í 2014, og tað er hent nógv hesi árini. Krøvini eru nógv herd, og tað er ikki eins lætt at halda uppá ungdómin sum tað var fyrr.

– Fyrr vóru vit á vøllinum og í felagshúsinum frá morgni til myrkurs, um vit sluppu, men í dag verða hølini ikki brúkt eins nógv. Tað er heilt greitt nakað vit arbeiða við, og tað tykist vera implimenterað í ávísan mun. Fleiri og fleiri møta fyrr til venjing, og brúka fasilitetirnir hjá okkum, og eisini eftir venjingar og dystir steðga leikarar á eina løtu, sigur forkvinnan.






***Elisabeth Haraldsen, forkvinna***

Elisabeth greiðir frá, at tá hon í byrjanini tók við sum forkvinna, var limaskarin í felagnum dalandi, og minkaði heilt niður í bert umleið 50 íðkandi limir. Men hetta broyttist tíbetur, og í dag eru tey uppi á umleið 120 íðkandi. Hon leggur afturat, at tað er ikki minst takkað verið lokala uppbakkingini og stuðlinum, at tað yvirhøvur letur seg gera at reka felagið.

– Vit eiga ómetaliga nógv góð og trúgv fólk at heita á, til at taka sær av alskyns smærri og størri uppgávum, og tey eru gullverd. Eisini stuðlarnir, teir eru fantastiskir, sigur forkvinnan avgjørd.

Spurd um hvørji mál MB hevur fyri komandi kappingarár og kanska framyvir, so fortelur Elisabeth Haraldsen okkum, at felagið hevur eina sera stóra og týdningarmikla uppgávu, og til at kunnu megna hesa, er kravið at karmarnir eru nøktandi.

– Sum felag ynskja vit at vera fevnandi og savnandi, og vónandi røkka øllum. Ikki bara teimum íðkandi, men eisini øllum øðrum. Vit ynskja at skapa eina felagskenslu, har øll verða inkluderaði, og góð við felagskapin, sigur forkvinnan, og leggur afturat, at

***“Vit ynskja at skapa eina felagskenslu, har øll verða inkluderaði, og góð við felagskapin”***

tey fyri umleið fimm árum síðani millum annað byrjaðu eitt tilboð fyri børn undir fimm ára aldur at royna seg við fótbóltsspølum, og at undirtøkan fyri hesum hevur verið góð.

Undirlagið á graslíkisvøllinum í Miðvági er frá 2011, og er rímiliga slitið, og felagshúsið manglar ábøtur, fyri at nøkta tørvin til at kappast í hægri deildum. Og hetta eru átaksøkir sum arbeitt verður við at fáa dagførd, fortelur forkvinnan.

Felagið verður í ár umboðað av U7, U9, U11, U13 og U16 á gentusíðuni, har tað er samstarv við 07 Vestur um U11, U13 og U16 gentuliðini. Á dreingjasíðuni hevur MB lið í U7 og U9 og so kemur besta mansliðið í 2. deild afturat. Ætlanir eru eisini um at melda eitt Old Boys lið til, men hesar ætlanirnar eru enn í stoypiskeiðini.

– Málið, sum felagið hevur sett sær at røkka komandi kappingarár, er at royna at kappast so høgt á stigatalvuni sum gjørligt, og soleiðis økja um áhugan hjá yngru ættarliðunum av leikarum, og annars byggja víðari á eina felagskenslu og ein kappingaranda, sum vónandi skal skýna ígjøgnum tá tey yngru gerast klár til fótbólt í eldri deildunum, sigur Elisabeth Haraldsen, forkvinna í Miðvágs Bóltfelag.



Eitt felag
***vit eiga***
í felag

betri.fo

betri

# STORMURIN HEVUR LAGT SEG Á ARGJUM

*Tað var rokaligt á Argjum í fjør. Nógvir nýggir leikarar, nýggjur venjari, ein miðlastormur og miðskeiðis í kappingini vóru nógvir leikarar og venjarin skiftir út. Men hóast tað sá rokaligt út, og til tíðir líktist einum fullkomnum ruðuleika, so komu úrslitini á vøllinum. AB vann millum annað á báðum grannunum og vísti til tíðir gott spæl. Seinasta triðingin tapti AB bara tríggjar dystir og fekk 12 stig*




**EINS OG RESTIN** av fótbóltsføroyum, so brynja argjamenn seg til eitt nýtt kappingarár, og aftur hesaferð verða teir at finna millum tey fremstu liðini. Men onkra løtu í fjør sá einki út, og felagið á Argjum var nógv í brennideplinum, har tað serliga vóru viðurskifti uttan fyri vøllin, ið settu dagsskránna.

– Eg haldi at tann stormurin, sum var, hevur lagt seg. Vit vistu tá vit fluttu upp í bestu deildina, at vit máttu gera okkurt, um vit skuldu yvirliva í 2022. Tí styrktu vit eisini hópin, tí liðið, sum endaði nummar 3 í 1. deild árið fyri, var ikki nóg sterkt til at spæla í Betri deildini. Jú, tað var rokaligt, men longu í seinnu hálvu haldi eg, at stormurin legði seg, og vit sóu eisini at spælið og úrslitini gjørdust betri, sigur Marius Thomassen, formaður í AB.




*Marius Thomassen, formaður*




# Vit skapa úrslit!

## VILJA HAVA RØTTU LEIKARARNAR

Argjamenn megnaði at fóta sær og AB tryggjaðu sær enn eitt ár í bestu deildini. Júst sum málið var. Teir kunnu tí vera nøgdir við árið, og á Argjum hava teir eisini eina greiða ætlan.

– Tað hevur verið arbeitt hart í vetrarsteðginum at finna just teir røttu leikararnar. Leikarar, sum passa inn til tann spælistílin, ið vit ynskja at spæla. Um nakar leikari kemur afturat hópinum, so er tað eftir okkara treytum – og tí at vit ynskja tað, greiðir Marius frá, sum gleðir seg til kappingarárið 2023.

Samanborið við farna kappingarár, er nakað av útskifting farin fram í hópinum hjá AB, og teirra millum eru tveir, sum taldust millum lyklaleikarunum hjá argjamonnum. Matthias Præst Nielsen er farin til HB, og Erik McCue er farin av landinum – umframt aðrir av útlendsku leikarunum, sum ikki halda fram á Argjum.

Men felagið hevur eisini fingið nakað av tilgongd. Framherjin, Aramis Kouzine, er komin úr donskum fótbólti, og avloysarin hjá Erik McCue bleiv longu funnin í fjør. Tað er Nicklas Mehl, sum kom til AB í summarsteðginum, men fekk eina álvarsaman skaða beinavegin, sum gjørdi, at hann ongan dyst spældi. Hann fer helst at manna miðverjuna hjá argjamonnum saman við Ramzi Idrissou.

***“Tað hevur verið arbeitt hart í vetrarsteðginum at finna just teir røttu leikararnar”***

## ÆTLA SÆR LONGUR FRAM

Í fjør gjørdist tað til eitt 8. pláss, men formaðurin ætlar, at kappingarárið í ár skal gerast betri.

– Sjálvandi ynskja vit at gera tað betri enn í fjør. Vit hava ein dugnaligan venjara, Henrik Larsen, sum kom til felagið í fjør. Vit hava sett okkum sum mál at røkka einum sætta plássi. Tað halda vit er realisktiskt. Tað var eitt skot á stongina í fjør, sum gjørdu, at vit ikki endaðu nummar seks. Sum sagt, so ynskja vit at gera tað betri enn í fjør, og tí ætla vit at koma longur fram á stigatalvuni, sigur Marius Thomassen at enda.

Árið í ár verður eisini serligt fyri AB og argjamenn. Í ár eru nevniliga 50 ár liðin, síðan felagið varð sett á stovn. So er spurningurin, um tað verður fremsta manslið hjá AB, ið koma við stóru føðingardagsgávuni til Marius og allar hinar fjepparanar á Argjum.

# TOFTAMENN ÆTLA SÆR MEIRA

*Á Toftum fegnast tey um, at B68 megnaði at halda fast í plássinum í fremstu deildini, og nú ætla tey at koma longur upp eftir stigatalvuni*

**TAÐ REIÐ UM SNARIÐ** í drúgva tíð hjá B68 í fjør, tá ið liðið næstan alt kappingarárið var í stórum niðurflytingarvanda. Men tá ið avtornaði, kláraðu toftamenn at hóra undan, og góða gongdin, sum liðið hevði í seinnu hálvu í fjør, hevur givið B68 blóð á tonna at røkka enn hægri málum.

## GJØRDU NØKUR TING RØTT Í FJØR

Miðskeiðis í kappingarárinum í fjør tók Jákup á Borg við starvinum sum høvuðsvenjari hjá B68, og hann setti beinanvegin sín dám á felagið, og nú hevur hann gjørt ein trý ára sáttmála við B68.

– Eg skrivaði ein trý ára sáttmála, tí eg sá, hvussu stórir møguleikar eru her í felagnum. Vit gjørdu nøkur ting røtt í fjør, men vit vilja gera tað betri, men tað má gerast stig fyri stig, og allir partar mugu hjálpa til, sigur Jákup á Borg.

Hann greiðir frá, at hann hevur síni greiðu mál fyri hesi trý árini, og tað er, at B68 í fótbóltshøpi skal ordiliga á Føroyakortið aftur, men hvussu langa tíð, ið tað fer at taka, dugir hann ikki at siga.



**“Vit skulu tora at droyma stórt, men tað krevur eisini, at alt rundan um felagið er í lagi”**

*Jákup á Borg, venjari*



– Sum sagt gjørdu vit nøkur ting rætt í fjør, og tá ið vit skiltust í fjør eftir kappingina, avtalaðu vit, at vit skuldu gera tað enn betri í ár, millum annað við at arbeiða enn harðari. Vit hava vant har nú í uppstartinum við nógvari kropsligari venjing, og har haldi eg, at serliga KÍ og HB hava víst vegin við fysiskari venjing, sum vit onnur eiga at taka við læru av, sigur B68-venjarin.

Til kappingarárið í ár hevur B68 eisini fingið tilgongd av leikarum, sum Jákup á Borg væntar fara at styrkja um liðið. Talan er bæði um ungar og evnaríkar leikarar, men eisini meiri royndar leikarar, sum hava spælt í bestu deildini í fleiri ár, og tí vónandi kunnu taka ábyrgd á liðnum.

## SKULU TORA AT DROYMA STÓRT

Jákup á Borg hevur sett sín dám á felagið, síðani hann kom til B68. Við sínum drúgvu royndum sum leikari á ovastu rók umframt sínum venjararoyndum, hevur hann ivaleyst nógv at geva av, og hann er stak væl nøgdur við tær umstøður, ið nú eru á Toftum.

– Í mínari verð er tað eingin ivi um, at vit skulu tora at droyma stórt, men tað krevur eisini, at alt rundan um felagið er í lagi, og har haldi, at vit eru á rættari leið, sigur hann.

Hann vísir í hesum sambandi á, at til dømis rúmið, sum verður brúkt til kropsliga venjing, er tvífaldað í støðd, og allar aðrar umstøður í felagnum eru eisini góðar sambært honum.

Jákup á Borg rósar í hesum sambandi eisini vinnulívinum í Nes kommunu fyri at standa væl saman um B68 og stuðla felagnum í arbeiðinum at røkka enn hægri málum.

## SKULU EISINI ANSA EFTIR

Men hóast man torir at droyma stórt á Toftum og á Svangaskarði, so dylur Jákup á Borg ikki fyri, at man samstundis eisini skal ansa eftir, at man ikki leypur framav.

***"Vit arbeiða við at fáa enn fleiri fólk, sum kunnu hava ein størri og virknari leiklut í B68, tí tað er neyðugt"***

– Tí um vit skulu røkka so langt, sum vit droyma um, so krevur tað bæði eyðmjúkleika og miðvíst, hart arbeiði, tí annars so koma vit at liggja fastir í botninum.

Hann sigur, at tað vísti seg fleiri ferðir í fjør, at um hugburðurin ikki var tann rætti til dystir, so kundu avrikini gerast ov vánalig, og so blíva úrslitini hareftir.

– Vit mugu vera eyðmjúkir og taka allar dystir í størsta álvara. Vit eru ikki so stórir, at vit kunnu taka nakran dyst sum eina avgreiðsluuppgávu. Vit skulu stríðast av øllum alvi í hvørjum einasta dysti, um vit skulu røkka okkara málum, sigur Jákup á Borg at enda.

## SKULU KLEKJA LOKALAR LEIKARAR TIL BESTA LIÐIÐ

Tað er eingin loyna, at besta liðið hjá B68 er ein blanding av lokalum leikarum og leikarum, ið eru komnir uttanífrá. Men sambært Jákupi á Borg vil B68 fegin, at man í størri mun fer at klekja lokalar leikarar til liðið.

– Vit hava sjálvandi fleiri lokalar á liðnum, sum nú er, og tað eru eisini eini tríggir ungir lokalir leikarar, sum hava fingið sáttmála nú, og sum eru blivnir partur av besta hópinum, sigur hann.

Men í B68 leggur man stóran dent á, at ungdómurin í felagnum hevur góðar umstøður, so at tey ungu trívast, og at tey tí blíva verandi í felagnum og í fótbóltinum.

– Vit royna upp á sigt eisini at byggja liðið rundanum lokalar leikarar, men tað krevur nógv av felagnum. Men um vit hava eina góða og virkna umgdómsdeild við væl skikkaðum venjarum, so skulu tey ungu nokk trívast, og so fara vit eisini at klekja enn fleiri leikarar til besta liðið, heldur hann.

Hetta krevur tó nógv av felagnum, og tí sigur Jákup á Borg, at tað er altavgerandi, at nógv fólk lyfta í felag í B68.

– Vit arbeiða við at fáa enn fleiri fólk, sum kunnu hava ein størri og virknari leiklut í B68, tí tað er neyðugt, sigur hann at enda.






# ROYNA EINA FERÐ AFTURAT

*Á grasvøllinum í Hvalba er tað ungdómsfótbóltur, ið fyllur mest, men sjarmerandi vøllurin er ein avbjóðing fyri menningina*

**ONGASTAÐNI Í FØROYUM** víkjur ein fótbóltsvøllur so nógv frá hinum, sum í Hvalba. Skrásettir dystir verða spældir aðrastaðni í oynni, til summardáar síggjast á grasfløtuni. Dreymurin um at kappast millum tey bestu í landinum er sleptur. Kommunan, sum telur bæði Hvalba og Sandvík, telur 669 fólk.

Nógv verður gjørt burturúr at menna og savna tey yngstu í kommununi til fótbólt. Til hetta hevur felagið tveir ungdómsvenjarar við hvør sínari bakgrund.

Sviin, Ken Fagerberg er fyrrverandi yrkisspælari, sum eina ferð bleiv seldur fyri 10 milliónir krónur til danska FC Midtjylland.

Hin er hvalbingurin, Brynjar Poulsen, sum fekk heiðurin ársins fyrimynd hjá ÍSF í 2021. Hann brúkar nógva tíð til at venja liðini í felagnum. Tað ger hann, hóast hann er føddur við breki og er partvíst lammaður í aðrari síðuni.

– Støðan hjá Royn er góð, tá hugsað verður um barna- og ungdómsarbeiðið. Nakað sum vit raðfesta høgt. Vit hava tveir góðar venjarar, ið eru sera dugnaligir og væl dámdir. Teir ganga høgt upp í tað teir gera, og hetta sæst aftur millum tey íðkandi. Seinastu árini er talið av íðkandi børnum og ungum vaksið nógv. Tað er av stórum týdningi fyri felagið, sigur Benjamin Miné Midjord, formaður í Royn.



***"Vit eru góð við vøllin og halda tað verða bæði stuttligt og sjarmerandi at spæla á grasinum"***




Ken Fagerberg, ungdómsvenjari

Hann leggur afturat, at hetta er í góðum samstarvi við ungdómsnevndina.

## NÝGGJUR VØLLUR OG SAMSTARV

Tað hevur sína sjarmu, at spæla á grasvøllinum á Skørðunum, men vøllurin er samstundis størsta avbjóðingin hjá felagnum.

– Vit eru góð við vøllin og halda tað verða bæði stuttligt og sjarmerandi at spæla á grasinum, men vøllurin er ikki nútíðarhóskandi. Vøllurin kann ikki brúkast ein stóran part av árinum, orsaka av gróðri og øðrum, og harafturat eru eingi ljós kring vøllin. Tí er avmarkað nær vøllurin kann brúkast, sigur Benjamin og leggur afturat:

– Hetta ger at menningin av okkara spælarum ikki er eins stór, sum hon kundi verið. Ein nýggjur vøllur er kostnaðarmikil, men er ovarliga á okkara ynskilista. Arbeiði at fáa nýggjan vøll er farið í gongd, men vit vita, at tað kann gerast drúgt – serliga við fíggingini.

Spurningurin um samstarv og samanlegging av fótbóltinum í Suðuroy er eitt evnið, ið ofta er uppi at venda. Nøkur eru fyri og onnur ímóti. Í Royn staðfesta tey bara, at tað riggar við U15, U17 og hjá kvinnunum.

– Vit hava verið glað fyri samstarvið, sum vit halda hevur riggað væl. Vit fara aftur at samstarva um U15, U17 og Betriliðið hjá kvinnum komandi kappingarár, sigur Benjamin Miné Midjord.



Benjamin Miné Midjord, formaður

## NÝGGJ STØÐA HJÁ TEIMUM VAKSNU

Besta manslíðið flutti í 2021 niður í 3. deild. Í fjør vóru boðini, at felagið fór ikki at leggja stóran dent á besta manslíðið, men í ár er søgan ein onnur.

Fótbóltssamband Føroya hevur víðkað 2. deild frá tíggju liðum upp í 12. Nýggju liðini í 2. deild eru bestu manslíðini hjá júst Royn og MB.

– Vit eru øgiliga glað um, at vit skulu spæla í 2. deild komandi ár. Vit vóru í 3. deild í fjør, men tað var ikki hugaligt. Tað var alt ov ofta, at lið ikki møttu upp til dyst í Hvalba. Av tí sama komu vit í eina ónda ringrás, ið gjørdi, at spælarar ikki tímdu at spæla og hetta hevði við sær, at trupult var at koma burturúr 3. deild, greiðir formaðurin frá.

Í ár er hugurin betri og liðið er longu farið í gongd við fyrireikingarnar. Royn hevur somu avbjóðingar sum hini feløgini í oynni. Fleiri av spælarunum arbeiða og búgva norðanfyri. Tað ger tað torført at venja saman, men størsti týdningurin er at dystir aftur eru á einasta grasvøllinum í Føroyum.

– Tað, at dystir aftur verða regluliga á Skørðunum, hevur eisini týdning fyri bygdina, tí tað eru fleiri, ið hava stóran áhuga fyri Royn. Vi ætla okkum at gera okkara besta í 2. deild. So fáa vit at síggja, hvussu langt tað røkkur, sigur Benjamin Miné Midjord.

Eins og formaðurin í felagnum, so sær Ken Fagerberg eisini við spenningi fram ímóti einum nýggjum fótbóltsárið, og hann ynskir at endurbyggja fótbóltsmentanina í Hvalba.

– Vit kunnu ikki blíva betri, um fótbólturin er aftast í raðfestingini á degnum. Tað kemur at taka tíð. Í løtuni snýr tað seg um at fáa fleiri at spæla fótbólt, og at tíma fótbóltin og Royn.

– Fyrst og fremst skulu vit hava teir spælararnar, sum eru her, í besta formin, uttan av blíva skaddir. Vit skulu eisini hava eina greiða spæliætlan, sum allir skilja, sigur Ken Fagerberg, og sum ikki er heilt ósamdur við formannin, tá tosað verður um vøllin á Skørðunum í Hvalba.

– Okkara størsta avbjóðing er vøllurin. Í løtuni venja vit styrki og smærri teknisk øvilsir í Royn høllini, sigur svíin at enda.






# Heilsugóður laksur

**Laksur er føðsluríkur og framúr góð protein-, vitamin- og mineralkelda. Serliga áhugaverdar eru omega-3 feittsýrurnar, ið stimbra heilan og smyrja liðirnar.**

Bakkafrost útflytir tað, sum svarar til omanfyri 1.000.000 døgurðar av laksi um dagin – til allan heimin. Heilsugóði og vælsmakkandi laksurin frá Bakkafrost fæst eisini í flest øllum handlum í Føroyum.

Tú finnur leskiligar uppskriftir við laksi her:

Bakkafrost P/F • Bakkavegur 9 • FO-625 Glyvrar • Tel 40 50 00 • www.bakkafrost.com

# SKULU GERAST STØÐUGIR

*ÍF er aftur í fremstu deildini hjá monnum, og nú ræður um hjá fuglfirðingum at gerast meiri støðugir og aftur gerast ein fastur partur av bestu mansdeildini*

**EFTIR NØKUR HELDUR** misjøvn úrslit seinastu tíggju árini skal ÍF nú aftur royna at fóta sær í Betri Deildini hjá monnum. Tað eru ikki meiri enn gott og væl tíggju ár síðani, at fuglfirðingar vóru í finaluni í kappingini um Løgmanssteypið tvey ár á rað, og hóast ÍF ikki hevur so høg mál í løtuni, so er ætlanin, at man skal koma longur upp á stigatalvuna, enn man hevur verið seinastu árini.

**FÍGGJARLIGT VARSEMI**

Fuglfirðingar hava fleiri ungar og evnaríkar leikarar, sum hava spælt seg inn á besta liðið. Aron Kensson, Jóhan Højbro og Rúnar Johnsson eru bara dømir um nakrar av teimum 17-18 ára gomlu, sum í fjør vóru fastir fúsir á besta liðnum, sum tá spældi í næstbestu deildini, har liðið endaði ovast á stigatalvuni.




***"Tað er umráðandi at hava eina stammu við lokalum leikarum, men vit mugu geva okkum ta tíð tað tekur"***

*Aleksandar Jovevic, venjari hjá Betri-monnum*





Hesir eru leikarar, sum ÍF skal byggja sína framtíð á saman øðrum lokalum kreftum. Harafturat eru tað aðrar eldri kreftir, sum hava verið við í nógv ár, sum framvegis eru tøkir, og sum hava tær royndir, sum ungu leikararnir ikki hava. Her verður hugsað um eitt nú Jan Ellingsgaard, Karl Løkin og Dánjal á Lakjuni.

Leiðslan í ÍF hevur fleiri ferðir meldað út, at fuglfirðingar ikki fara at leypa framav, nú uppflytingin var veruleiki, tí hóast man vil styrkja leikarahópinum, so skal tað gerast við fíggjarligum skili.

Aleksandar Jovevic er aftur í ár venjari hjá besta liðnum hjá ÍF, og hann dylur ikki fyri, at teir eldru leikararnir í hópinum hava sera stóran týdning.

– Vit hava rættiliga nógvar ungar við á liðnum, sum í fjør spældu nógvar dystir, og tað koma teir ivaleyst eisini at gera í ár. Tí er tað umráðandi við royndum leikarum, sum hava drúgvar royndir úr bestu deildini og kunnu brúka sína rutinu konstruktivt, sigur Aleksandar Jovevic.

Venjarin sigur, at harumframt eru tað nakrir 15-16 ára gamlir dreingir í felagnum, sum av álvara eru farnir at nærkast besta liðnum, og sum tey eru sera spent uppá í Fuglafirði.

## ARBEIÐA NÓGV VIÐ DISIPLIN

Venjarin hjá ÍF greiðir frá, at tað hevur stóran týdning, at hópurin hevur eina góða disiplin, bæði tá ið tað snýr seg um venjing og dyst.

– Tað hevur alt at siga, at vit eru meira stabilir í ár, tí kappingin í Betri Deildini er sera hørð. Men tað krevur so eisini, at vit hava eina góða disiplin, sigur Aleksandar Jovevic.

Hann vísir í hesum á, at disiplinin ikki var ein trupulleiki í fjør, tá ið liðið vann sær uppflyting úr næstbestu deildini.

– Í fjør spældu vit dyst leygardag, og so vandu vit sunnumorgun. Tað var ongantíð nakar trupulleiki, tí spælararnir fóru ongantíð í býin leygarkvøld, og tað er gleðiligt, tí venjingaradisiplinin er sera umráðandi, sigur hann.

## STÓRT ALDURSGLOPP

Hópurin hjá ÍF spennir rættiliga víða í aldri. Sum áðurnevnt eru nakrir heilt ungir, og so eru nakrir royndir, sum allir eru omanfyri tríati ár.

– Tað er eitt aldursglopp, og vit hava næstan ongar leikarar, sum eru millum 25 og 28 ár, tá ið menn eru kanska allarbest fyri. Men vit hava fingið tilgongd av nøkrum einstøkum útlendskum leikarum, sum vónandi kunnu geva okkara leikarum nakað. Teir eru fostraðir í einum øðrum venjingarumhvørvi, og eg vóni, at okkara ungu leikarar kunnu læra av teimum, hvussu man venur bæði mentalt og fysiskt, sigur Aleksandar Jovevic.

**_"Í onkrum dysti í fjør høvdu vit 10 leikarar úr Fuglafirði millum teir fyrstu ellivu. Nógv meiri lokalur kann man næstan ikki vera"_**

Hann vísir á, at hugsjónin hjá ÍF er, at man spakuliga skal byggja eitt lið upp rundan um teir ungu og lokalu leikararnar, sum nú eru komnir inn á besta liðið, men hann er greiður yvir, at tað fer at taka tíð.

– Tað er umráðandi at hava eina stammu við lokalum leikarum, men vit mugu geva okkum ta tíð tað tekur, sigur hann at enda.

## NÝTT HÚS VIÐ NÝGGJUM KARMUM

Fyri tveimum árum síðani fekk ÍF nýtt felagshús við vøllin í Fløtugerði, og tað er einki at ivast í, at húsið hevur stóran týdning fyri trivnaðin í felagnum.

– Húsið gevur okkum eitt stað at savnast, og tað gevur eina felagskenslu, ið er ótrúliga týdningarmikil í einum slíkum felag sum ÍF, sigur Aleksandar Jovevic.

## UMSTØÐUR TIL FYSISKA VENJING

Í nýggja ÍF-húsinum er eitt fitnessrúm, og tað er nakað, sum tey í Fuglafirði veruliga hava saknað í mong ár.

– Tað er nakað nýtt her í felagnum. Vit hava manglað tann fysiska partin, tí vit høvdu ikki nakað venjingarrúm til tað, og tí hava vit ordiliga verið aftan fyri tey flestu av hinum feløgunum á tí økinum, sigur ÍF-venjarin.

Hann greiðir frá, at nú hevur man fingið fysiskan venjara í felagnum, sum hevur skipaða fysiska venjing, og tað er nakað, sum man veruliga fokuserar uppá.

– Men nýggja húsið kann eisini virka til, at ungdómurin í felagnum støðist enn betur, og tað samsvarar væl við okkara hugsan um spakuliga at byggja eitt lið upp rundan um okkara ungu og lokalu leikarar. Men eg haldi eisini, at vit eru millum tey fremstu til at brúka lokalar leikarar. Í onkrum dysti í fjør í 1. deild høvdu vit 10 leikarar úr Fuglafirði millum teir fyrstu ellivu, og nógv meiri lokalur kann man næstan ikki vera, sigur Aleksandar Jovevic.



Vit ynskja ÍF góða eydnu við kappingarárinum

Fuglafjarðar kommuna
fuglafjordur.fo

HOYVÍK

# SAMANLEGGING GER OKKUM STERKARI

*Í Hoyvík er lokala fótbóltsfelagið nú blivin eitt sindur størri, eftir at FC Hoyvík hevur lagt saman við Undrinum. Undir nýggja navninum Fótbóltsfelagið Hoyvík skulu nýggj mál røkkast, og tað trúgvi tey uppá, tí samanleggingin hevur gjørt felagið sterkari*

**FORMLIGA HEVUR FC HOYVÍK** ikki broytt navn til Fótbóltsfelagið Hoyvík, fyrr enn hetta er viðtikið á einum eyka-aðalfundi. Men formaðurin í felagnum, Bjarni Beder, væntar, at hetta verður í næstum.

– At Undrið gerst partur av FC Hoyvík hevur við sær, at felagið veksur munandi í vaksnamannafótbólti, og tað hevur ikki minst við sær, at vit nú knappliga hava eitt lið í næstbestu deildini komandi kappingarár, sigur Bjarni Beder.

Formaðurin sigur, at felagið nú hevur eina slíka støðd, at tað bert manglar at hava lið í Betri Deildini hjá bæði kvinnum og monnum.

Nú FC Hoyvík og Undrið eru blivið eitt felag, er tað nevndin í FC Hoyvík, sum heldur fram, men tað er í samstarvi við nevndarlimir hjá Undrinum.





## FELAGSHÚSIÐ ER NÆSTA STÓRA MÁL

Tað er eingin loyna, at umstøðurnar hjá felagnum í Hoyvík ikki eru av teimum bestu, men Bjarni Beder sigur, at næsta stóra málið hjá felagnum er at fáa eitt felagshús upp at standa.

– Tað fyrireikandi arbeiðið hevur verið í gongd leingi saman við Tórshavnar kommunu, men tað hevur bara ikki gingið so skjótt. Vit hava eitt samskifti koyrandi um málið, og allir partar hava sum mál at fáa tað sett í verk sum skjótast, sigur formaðurin.

Hann greiðir frá, at tað er ein risastórur tørvur á einum felagshúsi, tí felagið veksur skjótt á øllum økjum, og eitt nýtt felagshús hevði líkasum verið sloyfan, sum bant felagsskapin í Hoyvík saman sambært honum.

– Men vit noyddust í fyrstu atløgu at raðfesta eina fyribils loysn, tí at byrja við høvdu vit ikki eingongd rennandi vatn við vøllin, sigur Bjarni Beder.

Hann greiðir frá, at felagið roynir eisini at arbeiða burðardygt, og tí vil man hava eina loysn, har húsið verið hitað við grønari orku. Samstundis er ætlanin, at vøllurin í Hoyvík skal skiftast í ár, og tá skal nýggi vøllurin vera ein grønari loysn, enn tann verandi vøllurin er.

## LEIKARAR SKULU FØLA SEG VÆL Í HOYVÍK

Í fjør hevði FC Hoyvík ikki lið í hvørki U15 ella U17 kappingini hjá dreingjum, men tað hevur felagið í ár, og formaðurin heldur, at tað hevur stóran týdning í mun til tilgongdina til besta liðið hjá fótbóltsfelagnum í Hoyvík.

– Vit vilja fegin, at fleiri av okkara egnu koma á besta liðið, sigur Bjarni Beder, formaður.

Hann leggur afturat, at felagið ikki fer út eftir ungum spælarum, tí tey vilja, at tey ungu skulu koma náttúrliga.

– Tey skulu føla seg væl heruppi, og tey skulu koma, tí tey føla seg væl her. Mynstrið er eisini, at tað eru fleiri, sum koma til, enn tað eru leikarar, ið fara, sigur hann.

Ungdómsliðini hjá FC Hoyvík gera eisini meira og meira vart við seg, og í fjør eydnaðist tað á fyrsta sinni felagnum at vinna eina steypakapping. Tað vóru U16 genturnar, sum vunnu gull, og júst somu gentur vunnu fyri nøkrum árum síðani eisini føroyameistaraheitið í kappingini fyri U13 gentur.

***“Gentusíðan hjá okkum blómar av álvara, og vit síggja ikki sama fráfall av leikarum á gentusíðuni, sum onnur feløg gera”***

– Gentusíðan hjá okkum blómar av álvara, og vit síggja ikki sama fráfall av leikarum á gentusíðuni, sum onnur feløg gera, sigur Bjarni Beder.

## NÓGV VIRKIN FÓLK KRING FELAGIÐ

Formaðurin í FC Hoyvík sigur, at felagið sum so ongan málsetning hevur um til dømis at røkka Betri Deildini í næstum, men um tað skuldi hent seg, so bleiv man eisini klárur til tað.

– Vit hava sum so ongan formellan málsetning enn at síggja menning hjá okkara leikarum, og tað vilja vit síggja yvir eitt longri tíðarskeið, sigur hann.

Bjarni Beder fegnast eisini um, at tað eru so nógv fólk í Hoyvík, sum eru virkin kring felagið, tí tað ger tað lættari at reka felagið.

– Tað er hugaligt, og vit síggja eisini í felagsskapinum, at felagið spennir ógvuliga vítt, sigur Bjarni Beder at enda.

## JENS MARTIN VIÐ RÓÐRIÐ Í TRÝ ÁR

Nýggi maðurin við róðrið hjá besta liðnum í Hoyvík verður navnframi Jens Martin Knudsen, sum í vetur hevur gjørt ein trý ára sáttmála við FC Hoyvík.

– Tað er nýtt, at vit gera ein so langan sáttmála, men tað er eisini í tráð við ta ætlan, sum vit hava lagt fyri felagið, og hvar vit ynskja, at felagið er um trý ár, sigur Bjarni Beder, formaður.

Hann sigur, at Jens Martin Knudsen kemur at hava ábyrgd av besta liðnum, men at runavíkingurin eisini hevur átikið sær at virka sum eitt slag av mennara fyri hinar venjararnar í felagnum.

## NÝGGJUR HØVUÐSUNGDÓMSVENJARI SETTUR

Umframt at Jens Martin Knudsen er settur sum høvuðsvenjari hjá 1. deildarliðnum hjá FC Hoyvík, so hevur felagið eisini sett nýggjan høvuðsungdómsvenjara. Tað er Leivur Simonsen, ið júst hevur lokið UEFA A-venjaraprógv frá Fótbóltssambandi Føroya.

– Leivur hevur verið rundan um fótbóltin í Hoyvík í fleiri ár, og vit eru sera fegin um, at hann hevur átikið sær uppgávuna, sigur Bjarni Beder.

Formaðurin í FC Hoyvík sigur, at felagið hevur sum málsetning at hava væl útbúnar venjarar til øll síni lið. Enn eru tey ikki komin á mál við hesum, og tað arbeiði heldur sjálvandi fram.




Matur við íblástri úr Fjareystri

UPPLATINGARTÍÐIR

MATSTOVAN
týsdag – sunnudag
17.00 – 21.00

ÚTVIÐ
týsdag – sunnudag
16.00 – 21.00

hvonn



# EIN NÝGGJ BYRJAN Í RUNAVÍK

*2022 var ikki árið hjá NSÍ. Fremsta manslið hjá felagnum, sum í nógv ár hevur verið fastur partur av oddastríðnum, flutti niður. Niðurflytingin varð staðfest tá grannarnir av Toftum vunnu í næstseinasta umfari*

MEÐAN RUNAVÍKINGAR MÁTTU síggja keðiliga veruleikan í eyguni, tá tað var staðfest, at fremsta manslið hjá NSÍ fór at flyta niður, so gekk betri á kvinnusíðuni, hóast tær ikki megnaðu at endurvinna steypakappingina.

Kvinnurnar endaðu á einum 2. plássi – tólv stig aftanfyri KÍ. Venjarin seinastu tvey árini, Poul Narvi Poulsen, er skiftur út. Í hansara stað er Allan Dybczak komin. Hann var í 2018 og 2019 venjari hjá kvinnunum hjá HB.

Nú skal havnamaðurin so royna seg við Løkin í Runavík. Fyri Allan er hetta ein spennandi avbjóðing.

– Hetta er eitt nýtt umhvørvið og nýggir leikarar. Hetta er samstundis eitt felag, sum hevur ambitiónir og hevur eitt gott "setup" á kvinnusíðuni. Mítt mál er at leikararnir – og eg – gera okkara allar besta. Um lyklaleikararnir er skaðafríðir, og vit hava tað neyðuga hepni við okkum, so skulu vit nokk gerast partur av toppstríðnum.





Seinastu árini hevur NSÍ verið millum FM biðlarnar. Liðið er mannað av fleiri landsliðsleikarum, og toppskjúttin og ein av størstu profilunum í føroyskum fótbólti seinnu árini, Heidi Sevdal, er eisini partur av hópinum. Júst Heidi og nýggi leikararin á liðnum, Sara Samson Lamhauge, vóru partur av HB liðnum, sum Allan vandi í 2019.

### MENNINIR NIÐUR AT VENDA

Málið er greitt. Besta mansliðið hjá NSÍ skal flyta upp, so teir aftur eru í Betri Deildini í 2024.

Venjarin er hin sami, Sámal Erik Hentze, ella Bagge, sum hann eisini verður nevndur, og hann hevur góð hagtøl at vísa á. Harafturat er málverjin, Kristian Joensen, komin aftur til barndómsfelagið eftir nógv ár í útlegd, og samstundis er greitt, at teir flestu av teimum lokalu spælarunum halda fram í felagnum.

Ein teirra er Mórits Heini Mortensen. Hann hevur seinastu árini verið fastur partur av NSÍ hópinum.

– Tað var ein sera tóm kensla at tá tað varð staðfest at vit fluttu niður. Men vit ælta okkum at flyta upp, so at vit aftur eru í Betri Deildini í 2024.



*Mórits Heini Mortensen, NSÍ*

***"Eg trúgvi sjálvandi uppá, at NSÍ verður aftur at síggja á toppinum skjótt. Vit hava ein hóp, sum vil arbeiða hart fyri at koma uppaftur"***

Ein maður, sum ikki fer at hjálpa Mórits Heina og hinum vespunum at flyta upp, er málkongurin í føroyskum fótbólti. Í 2023 er Klæmint Andrasson Olsen leigaður út til Breiðablik í Íslandi, og skal fyri fyrstu ferð umboða annað felag enn tað gula og svarta hjá runavíkingum.

– Tað verður rættiliga løgið, at Klæmint ikki verður partur av hópinum. Hagtølini hjá Klæminti tala fyri seg, so tað verður stórur saknur í honum, sigur Mórits Heini.

Talan er um ein leigusáttmála, so runavíkingar skulu vænta at síggja Klæmint Andrasson Olsen aftur í gulum og svørtum í 2024.

Hóast NSÍ er í einum dali í løtuni, so verður tað neyvan leingi, áðrenn vespurnar aftur er á tindinum, og mansliðið hjá felagnum aftur kappast um fremstu plássini.

– Eg trúgvi sjálvandi uppá, at NSÍ verður aftur at síggja á toppinum skjótt. Vit hava ein hóp, sum vil arbeiða hart fyri at koma uppaftur. Harumframt hava vit eitt sterkt venjaratoymið. Hetta verður heilt vist eitt spennandi og mennandi kappingarár hjá NSÍ hóast alt, sigur Mórits Heini Mortensen at enda.







# SJÁLDSOM STUÐULS-AVTALA TRYGGJAR ÓKEYPIS FÓTBÓLT

*Ein heilt serlig stuðulsavtala millum B71 og Sandoy Seafood hevur við sær, at øll børn í Sandoynni kunnu íðka bæði fótbólt og flogbólt ókeypis*

**TAÐ ER EINKI DULSMÁL,** at góðar stuðulsavtalur hava nógv at siga fyri ítróttarfeløgini í Føroyum. Men tað munnu vera fá feløg, sum hava eina stuðulsavtalu, sum tí B71 hevur við Sandoy Seafood.

Karl Vidtfeldt er formaður í B71, og hann greiðir soleiðis frá serligu avtaluni, sum bleiv gjørd seint í 2019.

– Tað var Óli Nattestad, sum stutt frammanundan hevði keypt Sandoy Seafood, ið vendi sær til mín, tí hann vildi gjarna stuðla B71. Eg hevði umhugsað frammanundan at venda mær til hansara, men var ikki komin so langt. So eg var sjálvandi fegin. Hann segði, at hann vildi gera eina eitt sindur øðrvísi stuðulsavtalu, enn tær vit vóru von við, sigur Karl Vidtfeldt.

## ØLL SKULDU SLEPPA AT RØRA SEG

Formaðurin í B71 sigur, at ynski hjá Óla Nattestad var, at øll børn og ung í Sandoynni skuldu sleppa at røra seg, uttan at tey noyddust at gjalda.

– Hetta kom so í gildi til kappingarárið 2020, og tað hevði ávirkan beinanvegin. Vit sóu beinanvegin, at talið av íðkandi limum vaks bæði í fótbóltinum og í flogbóltinum. Í mun til onnur feløg, so umboða vit meira enn bara fótbólt, tí vit hava flogbólt eisini, sigur Karl Vidtfeldt.

*"Tað hevði ávirkan beinanvegin. Vit sóu beinanvegin, at talið av íðkandi limum vaks bæði í fótbóltinum og í flogbóltinum"*





*Karl Vidtfeldt, formaðurin*

Talið av íðkandi børnum og ungum er hækkað líðandi hvørt ár síðani, og stuðulin frá Sandoy Seafood er hækkaður samsvarandi.

– Hetta er heilt fantastiskt fyri okkum sum felag, tí øll vita, at tað er tungt at reka eitt ítróttarfelag. Samstundis lættir hetta eisini nógv um hjá foreldrunum, so tað hevur bara gingið framá nú í nøkur ár, sigur formaðurin í B71.

## UNGDÓMSDEILDIN Í STØÐUGUM VØKSTRI

At fleiri og fleiri leggjast afturat fótbóltinum í Sandoynni sæst eisini aftur í talinum av liðum, sum B71 meldar til kappingar í fótbólti.

– Vit royna at hava lið í øllum kappingum. Vit harmast tó um ikki at vera ordiliga við á kvinnusíðuni, hóast vit eru væl við á gentusíðuni. Men skulu vit hava lið í vaksnamannadeildini hjá kvinnum, so er helst neyðugt, at tað verður í samstarvi við okkurt annað felag, sigur Karl Vidtfeldt.

Hann greiðir eisini frá, at í sambandi við U17 kappingina hjá dreingjum, so arbeiðir B71 við at fáa eitt lið í samstarvi við AB, og hann væntari eisini, at tað fer at røkka á mál við hesum.

– Vit hava eisini eitt U21-lið, og tað hevur stóran týdning fyri, at allir í oynni kunnu sleppa at spæla saman viðhvørt, sigur formaðurin.

Karl Vidtfeldt greiðir frá, at Richard Goffe er høvuðsvenjari í felagnum hjá bæði teimum ungu og vaksnu nú fjórða árið á rað, og hann hevur gjørt nógv gott fyri fótbóltin í oynni.

– Tað eru nógv fólk komin afturat, og tað er stuttligt at koma til kappingar inni í Dal og síggja, hvussu nógv fólk eru virkin og hjálpa til í slíkum førum, sigur hann.

## HAVA VERIÐ EINSTØK MÁL FRÁ BETRI DEILDINI

Tvey ár á rað hevur tað verið um reppið, at B71 hevur vunnið sær uppflyting í Betri Deildina hjá monnum, men enn hevur tað bara verið um reppið.

– Tvey tey síðstu árini hava vit bara verið eina verri málúrtøku frá uppflyting. Í ár hava vit frágongd upp á fýra leikarar. Tað er ein stórur missur fyri okkum, men vit meta, at vit hava nógvar góðar, ungar leikarar, sum skulu fáa møguleikan. Teir skulu tó hava eina tilvenjing, áðrenn teir eru heilt klárir.

– Men samanumtikið hevur tað verið ein jøvn menning við besta liðnum hjá okkum seinnu árini. Áhugin fyri liðnum er eisini stórur, tí tað eru altíð fitt av fólki og hyggja, tá ið teir venja, og vit hava helst eitt tað hægsta áskoðaratalið til dystir í næstbestu deildini, sigur Karl Vidtfeldt.

## FAST SAMBAND FER AT ÁVIRKA

Í hesum árinum verður væntandi koyrandi um Skopunarfjørð, og Karl Vidtfeldt er ikki í iva um, at tað kemur at hava stóra ávirkan á virksemið hjá B71.

– Tá vænta vit, at fólkatalið fer at vaksa, og at aldursamansetingin í oynni verður betur fyri at kunna koyra felagsskapin B71, sigur hann.

Somuleiðis vísir Karl Vidtfeldt á, at tað sæst aftur á besta liðnum, at tað ikki er landfast enn, tí teir hava so at siga bara lokalar leikarar, umframt nakrar heilt fáar útlendingar, sum styrkja hópin.

– Kanska fara vit tá at síggja onkrar leikarar, sum eru uppvaksnir í B71, men sum spæla aðrastaðni, koma heim aftur til barndómsfelagið. Tað fasta sambandið fer eisini at gera tað lættari hjá okkum at hava felagslið við onnur feløg, sum til dømis í kvinnukappingini, har vit áður hava havt felagslið saman við AB í Betri Deildini hjá kvinnum, sigur formaðurin.

Hann heldur somuleiðis, at tað ikki er óhugsandi, at tað tá er onkur norðanfjørðs, sum hevur hug at leita sær suður í Sandoynna at spæla fótbólt.

– Tað vil tíðin vísa. Í løtuni fegnast vit bara um góðu gongdina, og at vit hava leikarar úr øllum bygdum í oynni, umframt at vit hava leikarar úr Skúgvoy og enntá úr Stóra Dímun, sigur Karl Vidtfeldt at enda.

***“Vit hava helst eitt tað hægsta áskoðaratalið til dystir í næstbestu deildini”***












©NUDLAVIRKIÐ

Hilton Garden Inn Faroe Islands

Tak tær av løttum á Hilton Garden Inn.

Hilton Garden Inn Faroe Islands er ímyndin av norðurlendskum marglæti og hugna í Føroyum. Eitt sera vakurt og nútíðarligt hotell við stórfingnum kringsýni yvir føroyskt umhvørvi.

Njót heimskenda Hilton stílin við hjartaligum gestablídni, góðsku og tænastu. Vitja Hallartún, okkara bistro matstovu við fronskum íblástri og denti á føroyskar rávørur.

hiltongardeninn.fo (+298) 41 40 00

# MENTANIN Í FELAGNUM ER AT VINNA

*Formaðurin í HB, Páll Mohr Joensen, hevur góðar vónir til, at tað fer at gangast væl hjá HB í ár bæði hjá kvinnum og monnum. Hann sigur, at mentanin í felagnum er at vinna, men at tað skal ikki gerast fyri ein og hvønn prís*

HAVNAR BÓLTFELAG er ivaleyst mest sigursvanda felag í landinum, og tí er tað ikki av ongum, at tað ítróttarliga verður væntað nógv av felagnum, og Páll Mohr Joensen, formaður, er eisini tilvitaður um hetta.

**SNÝR SEG UM PENGAR**

– Í veruleikanum so botnar alt í pengum. Vit hava eina ávísa nøgd av pengum at arbeiða við, og so er spurningurin, hvussu man umsitur pengarnar. Vit vilja sjálvandi helst vinna føroyameistaraheitið hjá bæði kvinnum og monnum, men samstundis sær man í felagnum stórt virði í, at man hevur leikarar, sum eru uppfostraðir í felagnum, á liðnum, greiðir Páll Mohr Joensen frá.

Hann er tó skjótur at leggja afturat, at hetta ikki skal tulkast sum um, at man ikki er glaður fyri teir leikarar, sum eru komnir til felagið aðrastaðni frá.




*Páll Mohr Joensen, formaður*



– Tí tað eru vit. Nógvir av hesum leikarum hava eisini verið í felagnum í rættiliga rúma tíð, so vit síggja tey eisini sum rættar HB'arar.

Páll Mohr Joensen sigur, at í hansara eygum er tað einki ivamál, at krøvini í HB eru øðrvísi, enn hvat tey eru í øðrum feløgum.

– Tað er mentanin í felagnum. Vit vilja vinna við uppaldum leikarum, hóast vit eisini virðismeta teir, sum eru komnir uttanífrá, sigur hann.

Formaðurin í HB sigur, at eftir hansara tykki er tað umráðandi í sambandi við, hvussu man umsitur pengarnar í felagnum, at man finnur eina góða javnvág, so nakað fer til vaksnamannadeildirnar og nakað til ungdómsdeildina.

– Eg haldi, at vit hava eina góða javnvág í løtuni. Vit vilja gjarna kappast við KÍ og Víking um FM í Betri Deildini hjá monnum, men samstundis eisini síggja framgongd í ungdómsdeildunum, tí í mínari verð er ungdómurin grundarlagið undir eini sunnari framtíð í felagnum, sigur Páll Mohr Joensen.

## SPENNANDI KAPPINGARÁR FYRI FRAMMAN

Um sjálvt kappingarárið, ið stendur fyri framman, sigur HB-formaðurin, at hann er spentur upp á árið.

– Í ungdómsdeildunum er altíð trupult at spáa um, hvussu tað fer at ganga, men vit plaga at standa okkum væl. Men eg eri spentur upp á bæði kvinnurnar og menninar hjá okkum. Kvinnurnar eru sera ungar, so man kann ikki krevja ov nógv av teimum, men potentiali er øgiliga stórt, og við nýggjum venjara í Lukasz Cieslewicz á odda kann tað gerast sera spennandi.

– Viðvíkjandi manslíðnum so haldi eg tað vera umráðandi, at vit hava sama toymi kring liðið sum við kappingarenda í fjør, tí tað gevur ein ávísan stabilitet. Harumframt haldi eg, at vit hava styrkt okkum væl í vetur á plássum, har vit hava mangla okkurt, sigur Páll Mohr Joensen.

Hann heldur, at tað er ikki órímiligt at trúgva, at man hevur møguleika at vinna føroyameistaraheitið hjá bæði kvinnum og monnum, hóast tað ikki er nakað krav.

## GÓÐUR FELAGSANDI

Tað kann mangan vera trupult at reka eitt ítróttarfelag, og kanska serliga tá ið talan er um eitt so stórt felag sum HB, ið hevur sera nógv lið, sum taka lut í kappingum. Men HB-formaðurin letur væl at, hvussu tað gongur við at fáa fólk at hjálpa til.

***"Tað eru eini 1.000 fólk, sum hvørja viku eru virkin sum íðkarar. Hetta er helst størsta spælipláss í kommununi"***

– Sum heild er tað ikki lætt at fáa fólk at hjálpa til bæði sum vanlig hjálparfólk og sum venjarar. Men eg haldi, at tað er lættari nú, enn tað var fyri bara trimum árum síðani, tá ið eg sjálvur kom í nevndina. Vit hava ongantíð áður verið so tíðliga klár við øllum venjaratoymum sum í ár. Tað var klárt longu á nýggjárinum á næstan øllum økjum. Eg haldi faktisk, at tað er ein serlig entusiasma kring felagið, sum er ordiliga spennandi, heldur Páll Mohr Joensen.

Felagshúsið er karmur um alt virksemi, og í ár hevur HB-húsið 30 ár á baki.

– Karmarnir eru nøktandi framvegis. Gamaní eru onkur vikuskifti, har tað eru serliga nógvir dystir og kappingar, har tað kann standa á við plássi í skiftirúmunum, sigur formaðurin í HB.

Hann heldur, at tað er ein ávísur stoltleiki í húsinum, tí í Havn eiga feløgini sjálvi síni felagshús í mun til aðrastaðni í landinum.

– Vit skulu sjálvi gjalda alt í sambandi við húsið, so tað hevur sjálvandi við sær, at tað er minni eftir til okkurt annað. Men tað er eisini ein ávísur stoltleiki í tí, sigur Páll Mohr Joensen at enda.

## YNSKIR SÆR NÝHUGSAN Í GUNDADALI

Tað verður mangan funnist at Tórshavnar Býráð, at man brúkar ov nógvan pening upp á fótbóltin og Gundadal, men formaðurin í HB heldur, at fólk ikki hava innlit í alt virksemið, sum er í økinum.

– Man hoyrir ofta, at fótbólturin fer við øllum. Eg haldi ikki, at fólk vita, hvussu umfatandi virksemi er í Gundadali. Eg loyvi mær at gita, at tað eru eini 1.000 fólk, sum hvørja viku eru virkin sum íðkarar annaðhvørt í B36 ella HB. Hetta er helst størsta spælipláss í kommununi, sigur Páll Mohr Joensen.

## GOTT VIÐ EINUM KOMMUNALUM TILBOÐ

Formaðurin í HB sigur, at tað er einki at ivast í, at man hevur nakrar góðar fótbóltsvøllir í Gundadali, sum harumframt er eitt sera veðurgott stað.

– Men økið er steindeytt frá morgunstundini til einaferð miðskeiðis seinnapartin. Hví ikki gera okkurt kommunalt tilboð í Gundadali til tey børn, sum eru ov stór til vanligan frítíðarskúla? Tey fáa kanska frí klokkan tvey og skulu venja klokkan fýra. So kundi tað til dømis verið eitt tilboð um eitt slag av frítíðarskúla í Gundadali, har børnini kundu fingið hjálp til skúlatingini, meðan tey bíðaðu eftir at sleppa at venja. Tað haldi eg hevði verið spennandi og nýhugsan, sigur Páll Mohr Joensen.

Hann sigur, at hetta skal ikki skiljast sum nøkur atfinning móti kommununi.

– Vit hava eitt gott samstarv við Tórshavnar kommunu, og umstøðurnar eru góðar. Men tað er eitt stórt trýst á vallirnar, so tað hevði verið gott og ynskiligt við einum vølli afturat, sigur Páll Mohr Joensen.





# FRAMTÍÐIN Í VÁGUM ER BJØRT

*Navnframi danski venjarin hjá 07 Vestur, Michael Schjønberg, er ikki í iva um, at felagið hevur eina bjarta framtíð, tí nógvir evnaríkir leikarar eru í felagnum, og hugsjónin er, at man so líðandi skal byggja eitt lið upp um hesar leikarar*

TAÐ VAR IKKI HISSINI NAVN, sum 07 Vestur kom við, tá ið felagið undan kappingarárinum í fjør avdúkaði, hvør nýggi høvuðsvenjarin hjá vágamonnum var. Talan var um navnframa danan, Michael Schjønberg, ið hevur drúgvar royndir bæði sum leikari og venjari í bæði donskum og týskum fótbólti. Harumframt hevur hann spælt 44 A-landsdystir fyri Danmark, so hann hevur roynt eitt sindur av hvørjum.

Tað gekk eisini væl hjá danska venjaranum og vágamonnum í fjør, tí liðið endaði á einum 7. plássi og yvirlivdi tí væl og virðiliga í deildini, sum var endamálið undan kappingarbyrjan.

Nú fara Michael Schjønberg og 07 Vestur so undir næsta kappingarárið undir hansara leiðslu, og danin hevur fingið eina jaliga fatan av føroyskum fótbólti, meðan hann hevur verið her.



***"Til taktiskar venjingar stendur man nógv stillur, og tað kann man í heitari londum. Um eg geri tað her, so er stórur vandi fyri, at fleiri leikarar gerast sjúkir"***

*Michael Schjønberg, venjari*



## POSITIVUR FÓTBÓLTUR

– Sum heild hevur tað verið ein jalig uppliving. Eg haldi, at fótbólturin í Føroyum er undirmettur uttan fyri Føroyar, og eg má viðganga, at eg bleiv positivt yvirraskaður av støðinum í føroysku kappingini. Harumframt haldi eg, at liðini í Føroyum spæla positivan fótbólti og ikki bara "kick and rush", sum nógv kanska halda, sigur Michael Schjønberg.

Hann vísir tó á, at sjálvandi er tað munur á liðunum, tí tað er eisini ógvuliga ymiskt, hvussu nógvar pengar ymsu feløgini hava at ráða yvir.

– Tað er eingin loyna, at tað eru penganir, ið seta dagsskránna, og tey, sum hava flestar pengar, eru eisini tey, sum kunnu tryggja sær bestu umstøðurnar og bestu spælararnar. Men eg elski avbjóðingar, so eg grenji ikki. Eg eri nøgdur við tað, sum vit hava í 07 Vestur, sigur Michael Schjønberg.

Hann heldur, at føroyska kappingin minnir um hollendsku kappingini fyri nøkrum árum síðani, har tað vóru trý ella fýra feløg í toppinum, og so var tað restin.

## UPPSTARTURIN ER HARÐUR

Tað var ein øðrvísi uppliving fyri Michael Schjønberg, tá ið hann kom til Føroya á fyrsta sinni.

– Tá eg kom í fjør, høvdu vit ikki nógvar spælarar, og veðrið var avgjørt ikki við okkum, so tað var trupult at hava nakrar venjingar. Men mær dámar væl avbjóðingar, so tað var eisini ein jalig uppliving, sigur hann.

Danski venjarin heldur tó, at uppstarturin til fótbóltsárið í Føroyum er óneyðuga harður.

– Man spælir alt ov nógvar venjingardystir í Føroyum. Tá ið vit einaferð koma har til, at kappingin byrjar, hava vit longu spælt eini níggju venjingardystir, og tað haldi eg vera ov nógv. Aðrastaðnis fara lið á venjingarlegu í heitari londum, har man kann hava taktiskar venjingar, men tað ber ikki til her, sigur Michael Schjønberg og greiðir víðari frá.

– Til taktiskar venjingar stendur man nógv stillur, og tað kann man í heitari londum. Um eg geri tað her, so er stórur vandi fyri, at fleiri leikarar gerast sjúkir, sigur hann.

## TAÐ SÆR SPENNANDI ÚT Í VÁGUM

Michael Schjønberg heldur, at 07 Vestur hevur eina spennandi framtíð, tí tað er nógv gott í felagnum.

> ***"Í Føroyum fer man frá U17 til vaksnamannafótbólt, og tað er eitt øgiligt lop – eg vil næstan kalla tað brutalt"***

– Felagið raðfestir ungar leikarar, og vit hava fingið nógvar ungar og evnaríkar leikarar upp í hópin. Í løtuni eru tað eini átta heilt ungir leikarar, sum venja við, og í fjør høvdu vit fýra leikarar á U17-landsliðnum, og tað eru leikarar, sum í framtíðini skulu vera stuðulsleikarar á besta liðnum hjá okkum. Men tað tekur tíð, leggur hann dent á.

Hann sigur, at tað hevur tí eisini týdning, at man fær nakrar spælarar uttanífrá, sum eru uppfostraðir í einum elituumhvørvi.

– Hesir eru vanir við at venja sjálvir og liva eftir fótbóltinum, og vónandi kunnu teir ungu læra av hesum. Tað er umráðandi, tí vit skulu byggja uppá, og endamálið er avgjørt, at vit ikki skulu vera eitt sonevnt "elevatorlið", men eitt lið, sum er fastur partur av bestu deildini, sigur Michael Schjønberg.

Yvirskipað sigur danski venjarin, at hann og leikararnir gjørdu eina avtalu um, at teir í ár skulu hava fleiri stig enn í fjør, og tað trýr hann eisini uppá.

– Vit eru blivin klókari, enn vit vóru í fjør, og bulurin er tann sami. Harumframt hava vit ein fantastiskan stuðul uttan fyri vøllin. Tann uppbakningurin, ið vit fingu til steypadystin í Klaksvík í fjør kann ikki samanberast við nakað annað. Eg fái framvegis gásarhold bara við tankan. Her eru eisini so nógv ótrúliga røsk fólk, sum gera sjálvboðið arbeiði í felagnum, og teimum havi eg ómetaliga stóra virðing fyri, sigur Michael Schjønberg at enda.

## RISALOP TIL VAKSNAMANNAFÓTBÓLT Í FØROYUM

Eitt, sum Michael Schjønberg hevur lagt til merkis, síðani hann koma til Føroya, er stóra lopið frá ungdómsfótbólti til vaksnamannafótbólt.

– Í Danmark, Týskland og øðrum londum her í Norður-Evropa hevur man eina U19-kapping. Tað hava vit ikki í Føroyum, tí her fer man frá U17 til vaksnamannafótbólt, og tað er eitt øgiligt lop – eg vil næstan kalla tað brutalt, sigur hann.

Venjarin hjá 07 Vestur sigur, at næstan allir fótbóltsleikarar siga, at ein tann størsta avbjóðingin í einum fótbóltslívi er skiftið frá ungdómsfótbólti til vaksnamannafótbólt, og eftir hansara tykki er tað serliga hart her í Føroyum.

– Nú skal eg ikki siga, at man skal seta eina U19-kapping á stovn her í Føroyum, tí eg ivist ikki í, at tað er ein orsøk til, at man ikki hevur hesa kapping. Allarhelst er tað ikki nóg mikið av spælaratilfari til eina slíka kapping, sigur Michael Schjønberg.

Men hann vísir í hesum sambandi á, at man hevur eina U21-kapping, sum ikki tykist vera tikin í serliga stórum álvara av nógvum feløgum, og tað heldur hann vera spell.

– Eg trúgvi, at tað hevði verið gott fyri nógvar ungar leikarar, um tann kappingin bleiv tikin í størri álvara, so at hon hevði verið ein lopfjøl millum ungdómsfótbóltin og vaksnamannafótbóltin, tí sum nú er, er lopið ótrúliga stórt og hart fyri teir ungu spælararnar, sigur hann.





# ØLL MUGU STANDA SAMAN

*Skal fótbólturin vinna fram, mugu øll taka eina hond í vesturi á Eiðinum. Og skulu tey ungu spæla millum tey bestu, so er neyðugt við samstarvið í allari oynni, sigur formaðurin í FC Suðuroy*

**TAÐ ER EFTIRHONDINI** langtsíðani, at VB við sigri á B36 í Gundadali og vann FM. Dagarnir, tá tey smærri feløgini kundu kappast á jøvnum føti við tey stóru, eru farnir. Tað er eisini veruleikin vesturi á Eiðinum í Vági nú skjótt 23 ár eftir FM-sigurin.

Stóra avbjóðingin er at fáa skikkaðar venjarar til tey ungu, og at fáa øll at taka eina hond, so eldsálirnar ikki verða troyttaðar.

– Støðan er hampuliga góð, men tað hevði verið ynskiligt at fleiri foreldur og onnur tóku eina hond í, so tað ikki altíð eru tey somu, sum skulu bera tyngstu byrðurnar, sigur Eyðbjørn Thomsen, formaður í FC Suðuroy.

Felagið hevur áleið 150 íðkandi limir og hevur lið í næstan øllum deildunum. Formaðurin letur væl at huganum og evnunum hjá teimum ungu í felagnum, men stóra avbjóðingin er tá tey skulu spæla heilan vøll.







*"Børnini skulu hava tað gott og trygt, og vit vilja geva teimum bestu umstøðurnar at mennast"*

*Eyðbjørn Thomsen, formaður í FC Suðuroy*

– Um vit ikki samstarva í Suðri, so hava vit ongan kjans. Vit samstarva um U15 og U17. Tað riggar avbera væl. Vóru vit fyri okkum sjávi, so høvdu kanska akkurát 11 spælarar. Nú hava vit nakrar spælarar, TB hevur nakrar og Royn hevur kanska tríggjar ella fýra spælarar, og tað er kærkomið, sigur Eyðbjørn Thomsen.

Hann vísur eisini á góða samstarvið við kivnnuliðnum.

– Um vit ikki samstarva, so hava vit ongan kjans. Serliga Royn stendur eftir við ongum. Øll her Suðri kenna mína støðu. Vit mugu leggja saman og einki við nøkrum royndarári. Tað skal gerast ordiligt frá fyrsta degi, sigur Eyðbjørn Thomsen greiður á málinum.

Felagið hevur tað gott og nógv ung fólk venja vesturi á Eiðinum. Eins og hjá fleiri av smærru feløgunum, so er trivnaður og menning millum lyklaorðini.

– Vit vilja at børnini skulu hava tað gott og trygt, og vit vilja geva teimum bestu umstøðurnar at mennast. Tað skal okkurt heilt serligt til, um vit aftur skulu tosa um fótbólt í bestu deildini, sigur Eyðbjørn Thomsen.

Dreymarnir um toppfótbólt eru fyribils sleptir, so leingi einki samstarv er í oynni. Besta mansliðið spælir í 2. deild.



## PÓL SKAL STÍLA BESTA MANSLIÐNUM

Meðan kvinnuliðið er í samstarvið við TB og Royn, so skal besta mansliðið í holt við enn eitt kappingarár í 2. deild, sum er triðbesta deildin. Pengafótbólturin er lagdur á hillina og spælarar fáa ein felagssamsýning fyri at spæla. Í stóran mun er talan um ungar lokalar spælarar. Nýggjur venjari er fyrrverandi landsliðsspælarin, Pól Thorsteinsson.

– Tað eru sjálvandi avbjóðingar við fólki og at spælarar búgva norðanfyri, men eg hevði ikki tikið hesa uppgávuna á meg, um eg ikki var spentur og sá møguleikar, sigur Pól Thorsteinsson.

Í skrivandi løtu er óvist um royndir spælarar sum Heri Kjærbo og Ari Krosslá Poulsen spæla vesturi á Eiðinum komandi kappingarár. Umframt ungu og lokalu spælarararnar, so eru tríggir útlendskir spælarar við.

Teir eru Jimmy Abdul úr Nigeria, og Emmanuel Andorful úr Gana, ið eisini teljast millum teir ungu, og sum nú eisini ganga á ítróttarháskúlanum í Vági, og fyrrverandi miðverjin í felagnum, 34 ára gamli Valerian Iobashvili, sum er fluttur til Føroya at arbeiða.

– Vit vilja síggja menning í spælarunum. Størsta avbjóðingin er at fáa venjingarmongdina at hanga saman, tá fleiri spælarar búgva norðanfyri. Skulu teir venja við, so kunnu vit ikki venja mitt í viku, greiðir Pól Thorsteinsson frá.

Hann heldur fyri, at spælistílur og uppstillingar partvís verður skipað eftir hvørjar spælarar hann hevur, men Pól Thorsteinsson ynskir eisini, at spælið verður meira tolið.

– Um eg skal siga nakað um spælistíl, so vil eg gjarna hava liðið at spæla meira róligt. Onkuntíð haldi eg at FC Suðuroy hevur spælt ov beinleiðis, sigur Pól Thorsteinsson, sum als ikki er trýstur av formanninum til at flyta upp.

– Málið hjá felagnum er at besta liðið flytur upp, men tað er als einki krav.Tað trýstið vilja vit ikki leggja á venjaran og hópin, sum er so ungur, sigur Eyðbjørn Thomsen at enda.



TB/FCS/Royn

# FELAGS-LIÐIÐ SKAL STEÐGA FRÁ-FLYTINGINI

*Við góðum felagsskapið skal felagskvinnu-liðið í suðuroynni steðga fráflytingini av evnaríkum spælarum. Avgerðin um at melda til í Betri Deildini var røtt, sjálvt um úrslitini ikki vóru góð, sigur venjarin*



**Torgerð Suðuroy, TB/FCS/Royn**

**HÓAST FELAGSLIÐIÐ,** TB/FCS/Royn tapti allar dystirnar í farna kappingarárið, so vann felagsliðið stórt. Tað er niðurstøðan hjá Jón Paula Olsen, sum er venjari hjá TB/FCS/Royn. Málúrtøkan í fjør segði trý skorað mál og 194 í gjøgnum, men tað er ikki rætti mátistokkurin heldur venjari fyri. Ein stór orsøk er vánaliga uppmøtingin í 1. deild hjá kvinnum í Suðri.

– Vit vildu heldur melda til Betri Deildina og tapa, men fáa nógvar dystir móti góðum liðnum, enn at spæla í 1. deild og hini liðini ikki møta upp í Suðri. Tað gav ongan meining. Í seinnu hálvu av 2021 spældu vit bara ein heimadyst. Tá er skjótt at spælarar ikki tíma at brúka tíð upp á fótbólt, forklárar Jón Pauli Olsen.

Hann vísur eisini á rokið um Herjolv III, sum yvirtók siglingina fyri Smyril í seinnu hálvu í fjør.

– Tú kanst ímynda tær støðuna í fjør, um vit spældu í 1. deild. Tí var tað ein røtt avgerð at melda til. Vit hava í dag 15 til 20 spælarar, sum eru yngri enn 20



**Jón Pauli Olsen, venjari**

ár og hava spælt eitt heilt kappingarár í bestu deidini, staðfestur venjarin.

Hesum tekur Torgerð Fryda Dagfinsdóttir Suðuroy undir við.

– Vit eru eitt sera ungt, nýtt lið, sum kanska ger tað eitt sindur toført hjá okkum í bestu deildini. Men vit vita, at tað tekur tíð at byggja eitt gott lið upp, og eg haldi, at okkara góða samanhald hevur skumpað undir menning okkara, sigur hon.

Jón Pauli Olsen leggur eisini dent á, at spælararnir væl vistu, at hetta fór at verða eitt torført kappingarár, og tí hevur lítil dentur verið lagdur á sjálv úrslitini. Størsti denturin hevur verið á menningini og felagsskapin.

## FELAGSSKAPURIN SKAL STEÐGA FRÁFLYTINGINI

Seinast Suðuroyggin hevði lið í bestu kvinnudeildini var í 2012. Millum spælararnar tá var Rúna Jakobsen. Hon spælir í dag við HB og er á landsliðnum. Ein annar spælari úr Suðri, sum eisini er á landsliðnum í dag, er Julian Naomi Mortensen.

– Vit mangla ikki evnaríkar spælarar, sum vilja fótbólt. Tað síggja vit á landsliðnum. Tað, sum vit mangla, er eitt tilboð her í Suðri. Við góðum felagsskapi og menning skulu vit steðga fráflytingini, so spælararnir kunnu spæla her, sigur Jón Pauli.

Ein grundsteinur undir felagsliðnum er stuðulin í umhvørvinum. Bæði á og uttanfyri vøllin.

– Hóast úrslitini, so merkja vit, at vit fáa góðan stuðul úr oynni, sum ger, at vit blíva við at dríva á. Eisini er av týdningi, at eitt kvinnulið er í Suðuroynni, og at ungar gentur í Suðuroynni hava møguleika at spæla fótbólt, sigur Torgerð Suðuroy.

Felagsliðið hevur spent bogan í vetur og samlað pengar inn til eina venjingarlegu í Aalborg í Danmark.

– Her fáa vit eisini nakrar av okkara spælarum við, sum búgva í Danmark. Við hesum kunnu vit halda teimum til, so tær kunnu spæla við, tá tær eru í Føroyum, heldur venjarin fyri.

Felagsskapurin sæst eisini aftur til dystirnar, tí Jón Pauli Olsen hevur lagt nógv fyri, at allir spælararnir sleppa á vøllin til hvønn dyst. Lyklaorðið er menning.

> **“Eisini er av týdningi, at eitt kvinnulið er í Suðuroynni, og at ungar gentur í Suðuroynni hava møguleika at spæla fótbólt”**

– Tú sær lið ferðast langt við 18 spælarum og gera eina innskifting stutt fyri tíð. Tað riggar ikki fyri okkum. Sjálvandi royna vit at vinna, tá vit eru á vøllinum, men vit eru eisini við fyri at menna spælarar, og tí royni eg at skifta allar inn í hvørjum dysti, forklárar venjarin.

Torgerð Suðuroy tekur undir við honum.

– Nærum allar fáa spælitíð, sum ger, at vit allar menna okkum. Vit vita, at man kemur ikki upp á toppin eftir einum degi, og tað er sum so heldur ikki okkara mál í løtuni. Vit royna at fokusera á at menna allar spælarar, venja hart, hava gott samanhald, og so skal alt liðið nokk byrja at flyta seg rætta vegin, staðfestur 20 ára gamla Torgerð Suðuroy.

Liðið hevur tó tveir útlendskar spælarar. 28 ára gamli málverjin, Flor Mercau, og 26 ára gamli miðvallarin, Macarena Abalos. Báðar úr Argentina og tær verða aftur á liðnum í ár.

– Vit ásannaðu eisini, at vit máttu hava onkran styrk, sum tær ungu kunnu lena seg uppat. Tær verða báðar við aftur í ár, sigur Jón Pauli Olsen, sum hevur eitt mál fyri komandi kappingarár.

– Vit skulu betra okkum!

*Úr São Paulo til Sørvágs*

# EIN SØGA UM BRASILSKU INNRÁSINA Í FØROYSKAN KVINNU-FÓTBÓLT



***Evelin Da Silva Mastropasqua, 07 Vestur***

HON KOM ÚR EINUM ØÐRUM HEIMI. Á brasilsku eysturstrondini liggur risastóri brasilski metropolurin,São Paulo. Meir enn 12 milliónir fólk av alskyns uppruna liva tætt saman í lágtropiska veðurlagnum, sum hevur við sær slavin og heit summur.

Ein av íbúgvunum er Evelin Da Silva Mastropasqua. Hon býr í forstaðsbýnum, Francisco Morato, og livir av at spæla yrkisfótbólt, tá hon brádliga fær eitt óvæntað tilboð úr einum lítlum landi, sum hon ongantíð hevur hoyrt um.

## 07 BRASIL

Árið er 2021, og á Dungasandi í Sørvági fyrireikar 07 Vestur seg til at hava lið í bestu deildini við kvinnum fyri fyrstu ferð. Frankie Jensen stendur á odda, og semja er um, at um fyrsta royndin skal eydnast, má hópurin styrkjast. Fyrst verður leitað í Íslandi uttan úrslit, og tí verður verður sjónarringurin víðkaður munandi.



***Brasilska innrásin á flogvøllinum***

– Eg var og ferðaðist í Brasil í januar í 2021, og spurdi so Jens Erik (Rasmussen, red.), sum arbeiddi í 07 Vestur: “Hvat við at fáa nakrar spælarar her frá?”, fortelur Frankie Jensen.

Tað eydnast at gera avtalu við verjuspælaran, Katlyn Ferreira Soares, og málverjan, Francielly ‘Fran’ Da Silva Rosa. Men afturkomin til Føroyar er venjarin kortini ikki nøgdur. Ein álopsspælari vantar, og Frankie Jensen ger ein roynd afturat.

– Eg kom í tankar um ein agent, sum hevði verið í samband við meg fyrr, og skrivi til hansara. Hann vísir mær so á hesa, sum eitur Evelin, minnist Frankie Jensen.

Umboðsmaðurin luktar pengar, men tað eydnast venjaranum at finna Evelin á Instagram, og hann sendir henni eini boð.

## 10.000 KILOMETRAR HEIMANIFRÁ

23 ára gamli framherjin má á netið at finna útav, hvat Føroyar og 07 Vestur eru.

Koronufarsóttin herjar, óvissa valdar í heimlandinum og tí ger framherjin av at flyta teir 10.000 kilometrarnar úr São Paulo til lítlu bygdina, Sørvág, í Føroyum.

– Eg havi altíð havt ein dreym um at spæla fótbólt uttanfyri Brasil, og sjálvt um hetta var eitt stórt lop fyri meg, ljóðaði tað áhugavert, greiðir Evelin frá. Hon tosar á portugisiskum, og Jens Erik Rasmussen, sum nú starvast sum ungdómsvenjari í HB, týðir til føroyskt.

Hon visti, at í Føroyum skuldi hon vera áhugaspælari, men tilboð um fast arbeiði við munandi betri løn enn tað, sum hon var von við, lokkaði.

Seint í mars spælir 07 Vestur sín fyrsta dyst í bestu deildini, og tá eru tær tríggjar, Katlyn og Fran úr Rio De Janeiro og Evelin, á vøllinum á Dungasandi.

> **“Her er langt ímillum húsini, og øll hava hvør sín hava. Heima er so nógv ferðsla, so nógv fólk og nógvur kriminalitetur”**

TAÐ ER ILLFÝSIÐ hendan vetrardagin síðst í januar í 2023. Evelin Da Silva Mastropasqua er júst afturkomin til Føroyar eftir vetrarsteðg í São Paulo. Hon fer nú undir sítt triðja ár í 07 Vestur, og ímeðan hon av og á munnar sær av kaffinum, greiðir hon frá, hvussu hon hevur havt tað tey bæði undanfarnu árini í lítla landinum, sum hon nú kennir væl betri.

– Sjálvt um munurin var stórur á bæði mentan, málið og fólkið, var tað ikki so trupult hjá mær at venja meg við landið. Tað var líka veðrið, ið argaði og enn argar, flennir Evelin, og peikar út ígjøgnum rútarnar, har regnið oysir niður.

Henni dámar betur um summarið, tá veðrið hóast alt batnar eitt sindur. Tá fer hon javnan túrar til gongu ella við bili út í føroysku náttúruna, har tað er víðari og frískari enn í smølu gøtunum í São Paulo.

– Her er so langt ímillum húsini, og øll hava hvør sín hava, sigur hon.

– Heima er so nógv ferðsla, so nógv fólk og nógvur kriminalitetur.

Umframt brasilsku liðfelagarnar vóru onnur í 07 Vestur – bæði í Betri-hópinum og í felagnum annars – sum tosaðu portugisiskt, og hetta hjálpti sjálvandi nógv. Nú dugir hon betri enskt og skilir føroyskt eitt sindur, at tað ger ikki gerandisdagin verri.

## SKULDI VENJA SEG VIÐ FISKALUKTIN

Stórur munur er á fólkasløgunum báðum, heldur hon kortini. Brasilianarar eru útvendir og glaðir og skulu klemma og mussa, tá teir hittast.

– Her er tað øvugt. Fólk tykjast hulari, men tá tú kemur at kenna tey, eru tey blíð og fitt, sigur 07 Vestur-framherjin.

Hon hevur arbeitt á virkinum hjá Luna í tvey ár, og har trívist hon sera væl, hóast hon var skeptisk í fyrstani.

– Eg skuldi arbeiða við fiski, og mær dámar ikki fisk – eg eti tað als ikki – so eg skuldi venja meg við luktin, sigur Evelin, sum hevur tað gott saman við teim nógvu útlendingunum, ið hon arbeiðir saman við.

– Mær dámar so mikið væl, at eg einki hevði havt ímóti at havt eitt slíkt arbeiði heima í São Paulo, leggur hon afturat. Hóast Evelin hevur lagt yrkisfótbóltin til síðis, og tað tíðum er strævið at venja eftir arbeiðstíð, eru nógvir fyrimunir. Ikki minst, at hon kann hjálpa familjuni heima í Brasil fíggjarliga við lønini, sum hon fær her.

Samanumtikið bjóðar Føroyar henni eitt trygt útgangsstøði, og hóast hon – eins og allir aðrir fótbóltsspælarar – droymir um at spæla á hægri stigi, skal nógv til at flyta hana úr Sørvági.

– Eg dugi ikki at siga, hvussu leingi eg verði verandi her, men mær dámar øgiliga væl, og so leingi eg geri tað, fari eg ongan veg, sigur Evelin.

## BJÓÐAR AV Á VØLLINUM

Og so má fótbólturin heldur ikki gloymast, tí á vøllinum hevur eisini gingið væl, bæði hjá Evelin og 07 Vestur. Brasilski framherjin hevur við sínum 21 málum helst verið størsta einstaka orsøkin til, at tær á Dungasandi alsamt hava tikið seg fram, og nú kunnu bjóða øllum hinum liðunum í deildini av.

– Føroyski fótbólturin er kroppsligari enn tann brasilski. Tú skalt renna aftur og fram, og stórur dentur verður lagdur á taktikk. Í Brasil snýr tað seg meir um teknikk og einstaklingaavrik. Tú tú fært bóltin, verður roknað við, at tú bjóðar av, sigur 07 Vestur-framherjin.

At Evelin Da Silva Mastropasqua fer at bjóða teimum av aftur í 2023, skulu mótstøðuverjurnar í Betri Deildini kenna seg vísar í.

## BRASIL VÆL UMBOÐAÐ Í 2023

**07 Vestur:** Evelin Da Silva Mastropasqua, framherji, Katlyn Soares, verjuspælari og Carol Assis Silva, miðvallari.

**B36:** Livyan Kétille Borges Silva, miðvallari, Jiselle Lazerda Dos Santos Souza, verjuspælari og Stefani Cabral, framherji.

– Vit eru tríggjar, sum búgva saman í Sørvági í húsi fyri okkum sjálvar, og so eru tað B36-genturnar í Havn. Vit eru væl allar samlar og hittast javnan, og tað hevur stóran týdning, tí vit eru so langt heimanifrá. Soleiðis varðveita vit sambandið við heimlandið, tosa portugisiskt og hava tað stuttligt saman, sigur 25 ára gamla Evelin Da Silva Mastropasqua.

# SAMBA DE BESEKSOGTREDIVÉ

***Brasilsku spælararnir í B36 hava lyft stigið í Betri-hópinum munandi, og hava yvirhøvur verið fyrimyndarligar. Tað sigur Súsanna Maria Hansen, sum situr í nevndini og í kvinnubólkinum hjá árstalsfelagnum.***

UNDAN KAPPINGARBYRJAN í 2022 gjørdi B36 av, at besta liðið við kvinnum skuldi styrkjast. Ein danskur spælari var til royndarvenjing, men hálsaði um, og brádliga stakk ein annar møguleiki seg upp. Frankie Jensen hevði fingið tveir brasilskar spælarar afturat til Føroyar. Tær báðar, Livyan Kétille Borges Silva og Jiselle Lazerda Dos Santos Souza, vóru ætlaðar til 07 Vestur, men tá sandoyingurin brádliga ikki var venjari í Sørvági meir, fekk B36 kjansin.

– Alt hendi øgiliga brádliga, vit skuldu taka nógvar skjótar avgerðir og vit ivaðust í, um hetta mundi verið tað rætta. Vit vistu, at tær ikki dugdu enskt, og vit vistu heldur ikki, hvussu tær vóru uttanfyri vøllin, greiðir Súsanna Maria Hansen frá.

– Men vit lótu ivan koma teimum til góðar, og vit hava ikki angrað tað eina løtu.

## HAVA KOLLVELT UMKLÆÐINGARRÚMIÐ

Nýggju brasilsku spælararnir hava kollvelt hugburðin í B36-hópinum, greiðir Súsanna Maria Hansen. Tær vóru yrkisspælarar í heimlandinum, og komu tí við einum yrkishugburði inn í felagið. Hetta hava ungu føroysku spælararnir í B36 tikið til sín, og økta kappingin um plássini ger, at venjingardisiplinin er nógv betri nú enn fyrr.

Yvirhøvur eru tær glaðar, siga seg trívast væl og skapa gleði rundanum seg. Hetta sæst eisini aftur á vøllinum.

– Um vit skjóta mál, so syrgja tær fyri, at tað verður fegnast um tað við einum lítlum dansi ella líknandi, sigur Súsanna Maria. Hinvegin hava tær eisini fingið okkurt burturúr. Á taktiska og kroppsliga økinum hava tær ment seg, tí lítil dentur verður lagdur á tað í Brasil, har tað snýr seg meir um teknikk og einstaklingaavrik.

## MÁLIÐ ER EIN SNÁVINGARSTEINUR

Livyan Kétille Borges Silva og Jiselle Lazerda Dos Santos Souza hava verið ein fongur fyri B36, men felagið ger eisini nógv fyri, at tær skulu trívast og hava góðar umstøður, sigur Súsanna Maria Hansen. Einasti veruligi trupulleikin er málið, tí tær báðar duga hvørki enskt ella føroyskt.

Í fyrstani vóru nakrir tolkar knýttir at Betri-hópinum fyri at tær skuldu trívast, og tað riggaði væl. Seinni hevur google-translate verið dúgliga brúkt. Tað er nóg gott í fótbóltsbløðruni, men uttanfyri vøllin er verri. Tær hava arbeitt á Vaðhorn á Strondum, og tað hevur riggað væl, men tað krevur nógv av teimum, og tí hevur verið roynt at finna annað starv til tær í Havn. Men tað hevur verið truplt.

– Fyrsti spurningurin er altíð, um tær tosa føroyskt ella enskt, sigur Súsanna Maria Hansen.

Í ár skipar B36 fyri undirvísing í føroyskum fyri teimum báðum og Stefani Cabral, sum er komin afturat úr NSÍ. Sostatt verður ein brasilianari í hvørjari ketu hjá B36, sum ætlar sær longri upp á stigatalvuna enn 4. plássið, sum tær fingu í fjør.



Brasilsku B36-genturnar og Frankie

# MIÐLARNIR TIPPA BETRI DEILDIN 2023

betri DEILDIN







| | Jákup Ósá (bolt.fo) | Agnar Prestá (portal.fo) | Sigurjón Einarsson (Dimmalætting) | Heidi Lava Elgeirsdóttir (Kringvarp Føroya) | John Andersen (Televarpið) |
|---|---|---|---|---|---|
| **Betri Deildin MENN** | | | | | |
| 1. | HB | KÍ | HB | VÍKINGUR | HB |
| 2. | VÍKINGUR | HB | KÍ | HB | KÍ |
| 3. | KÍ | VÍKINGUR | VÍKINGUR | KÍ | VÍKINGUR |
| 4. | B36 | B36 | B36 | B36 | B36 |
| 5. | B68 | B68 | B68 | B68 | EB/STREYMUR |
| 6. | AB | 07 VESTUR | 07 VESTUR | 07 VESTUR | B68 |
| 7. | 07 VESTUR | EB/STREYMUR | EB/STREYMUR | EB/STREYMUR | 07 VESTUR |
| 8. | EB/STREYMUR | AB | AB | ÍF | AB |
| 9. | TB | ÍF | ÍF | AB | ÍF |
| 10. | ÍF | TB | TB | TB | TB |
| **Betri Deildin KVINNUR** | | | | | |
| 1. | KÍ | KÍ | KÍ | KÍ | NSÍ |
| 2. | NSÍ | NSÍ | NSÍ | B36 | KÍ |
| 3. | B36 | B36 | HB | NSÍ | B36 |
| 4. | VÍKINGUR | EBS/SKÁLA | EBS/SKÁLA | HB | HB |
| 5. | HB | HB | B36 | 07 VESTUR | EBS/SKÁLA |
| 6. | 07 VESTUR | VÍKINGUR | VÍKINGUR | VÍKINGUR | VÍKINGUR |
| 7. | EBS/SKÁLA | 07 VESTUR | 07 VESTUR | EBS/SKÁLA | 07 VESTUR |
| 8. | TB/FCS/ROYN | TB/FCS/ROYN | TB/FCS/ROYN | TB/FCS/ROYN | TB/FCS/ROYN |







| | Sverri Egholm (portal.fo) | Jógvan Skeel Nolsøe (Kringvarp Føroya) | Símun Christian Olsen (Kringvarp Føroya) | Niels Petersen (Televarpið) | Tróndur Arge (Ellivu) |
|---|---|---|---|---|---|
| **Betri Deildin MENN** | | | | | |
| 1. | HB | HB | KÍ | HB | HB |
| 2. | KÍ | KÍ | HB | KÍ | KÍ |
| 3. | VÍKINGUR | VÍKINGUR | VÍKINGUR | VÍKINGUR | VÍKINGUR |
| 4. | B36 | B68 | B36 | B36 | B36 |
| 5. | B68 | B36 | B68 | B68 | B68 |
| 6. | EB/STREYMUR | EB/STREYMUR | EB/STREYMUR | AB | 07 VESTUR |
| 7. | AB | ÍF | 07 VESTUR | EB/STREYMUR | AB |
| 8. | 07 VESTUR | 07 VESTUR | AB | 07 VESTUR | EB/STREYMUR |
| 9. | ÍF | AB | ÍF | TB | ÍF |
| 10. | TB | TB | TB | ÍF | TB |
| **Betri Deildin KVINNUR** | | | | | |
| 1. | KÍ | KÍ | KÍ | KÍ | KÍ |
| 2. | NSÍ | B36 | NSÍ | NSÍ | NSÍ |
| 3. | B36 | NSÍ | B36 | HB | HB |
| 4. | HB | HB | HB | VÍKINGUR | B36 |
| 5. | EBS/SKÁLA | VÍKINGUR | EBS/SKÁLA | B36 | VÍKINGUR |
| 6. | 07 VESTUR | EBS/SKÁLA | VÍKINGUR | EBS/SKÁLA | EBS/SKÁLA |
| 7. | VÍKINGUR | 07 VESTUR | 07 VESTUR | 07 VESTUR | 07 VESTUR |
| 8. | TB/FCS/ROYN | TB/FCS/ROYN | TB/FCS/ROYN | TB/FCS/ROYN | TB/FCS/ROYN |

# NÓGV NÝTT Í NÝGGJA ÁRINUM

*2023 hevur nógv nýtt at bjóða kvinnulandsliðnum – vit hava skift orð við liðskiparan um nakrar av avbjóðingunum, sum bíða í nýggja árinum*



*Ásla Johannesen, liðskipari á landsliðnum og Damallsvenskan leikari*





**LIÐSKIPARIN** á kvinnulandsliðnum, Ásla Johannesen, byrjaði sjálv nýggja árið við at pakka kuffertið og flyta til Piteå í svenska Lapplandinum. Eftir fýra ár í donskum fótbólti, fer vinstrabeinti bakkurin nú at royna seg í bestu svensku deildini, Damallsvenskan. Ásla greiðir frá, at talan longu frá byrjan er um ein heilt nýggjan gerandisdag fyri hennara viðkomandi.

– Vit venja rættiliga nógv og eg livi gerandisdagin sum fulltíðarprofessionell, har eg kann hugsavna meg um venjing, hvíld og sum heild fyrireiking til næstu venjing. Tað er eitt mál, sum eg havi arbeitt hart fyri at røkka, og eg gleði meg nógv til hetta kappingarárið, sigur Ásla Johannesen, sum í fyrsta umfari hevur ein 1-ára sáttmála við Piteå IF.

Men tað er ikki bert á persónligu yrkisleiðini, at Ásla skal venja seg við nýggj viðurskifti. Í landsliðshøpi er talan eisini um eina spennandi skiftistíð, har fyrra hálva serliga fer at snúgva seg um venjaraskifti og fyrireiking til nýggja kappingarleistin, sum fer av bakkastokki í seinnu hálvu.

## TÍÐIN VIÐ TERP

Um ársskiftið gjørdist greitt, at Lene Bjerning Terp gevst sum landsliðsvenjari eftir tvey ár í starvinum, og fyrsta uppgávan hjá avloysara hennara verður at fyrireika liðið til spildurnýggja kappingarleistin UEFA Nations League, sum byrjar í heyst.

Hóast venjaraskifti eru ein nattúrligur partur av fótbóltinum, so væntar Ásla, at hetta verður nakað, sum helst fer at seta sín dám á fyrru árshálvu.

– Vit hava verið ígjøgnum stórar broytingar við landsliðnum seinastu fimm-tíggju árini, og vit hava veruliga upplivað stóra menning og framgongd á nógvum økjum. Við Lene hendi eisini ein risastór menning. FSF uppraðfesti starvið til eina fulltíðarsetan, og so sjálvandi eisini, tí at hon sum persónur og profilur gav okkum ómetaliga nógv, sigur royndi liðskiparin.

Leikliga hevur landsliðið eisini tikið seg fram, og fyri Áslu og liðfelagarnar verður bíðað við spenningi eftir at finna útav, hvør avloysarin verður.

– Vit eru í einari spennandi tíð við landsliðnum beint nú, og fyri okkum hevur tað stóran týdning, at vit framhaldandi hækka krøvini og væntanirnar til okkum sjálvar, soleiðis at vit kunnu skapa fleiri góð úrslit. So eftir mínum tykki eigur tað eisini at vera hægsta raðfesting hjá nýggja landsliðsvenjaranum, sigur Ásla Johannesen.

## NATIONS LEAGUE ER EIN GÁVA

Skráin hjá kvinnulandsliðnum er í fyrru hálvu merkt av venjingum og tveimum vinardystum móti Luksemborg í apríl. Í mai verður lutakastið til fyrstu útgávuna av UEFA Nations League fyri kvinnur, og tá verður greitt, hvørjum Føroyar skulu spæla ímóti í heyst.

UEFA Nations League kappingin fyri kvinnur verður skipað í trimum deildum (A, B og C). Føroyar eru í løtuni nummar 43 av 52 evropeiskum londum á FIFA styrkislistanum fyri kvinnulandslið, og byrja tí kappingina í deild C.

Kappingarleisturin verður her, sum vit kenna tað frá Nations League-kappingunum hjá monnum, men á kvinnusíðuni verður sami kappingarleistur eisini galdandi í undankappingunum til stóru EM og HM endaspølini. Tá skulu bestu liðini úr C-deildini spæla play-off dystir móti teimum liðunum, sum enda aftast í bólkaspælinum í deild A.

Sostatt kunnu aftaru londini framvegis vinna sær rættin til at spæla móti teimum ovaru londunum í kappingini um at sleppa til endaspølini. Nýggi leisturin leggur upp til fleiri landsdystir við meira spenningi, og hetta er ein gáva til londini í øllum styrkisbólkum, heldur føroyski liðskiparin.

– Eftir mínum tykki er hetta ein fantastisk broyting fyri okkum og øll hini. Vit hava enn møguleika fyri at kunna spæla móti teimum bestu londunum, men meirilutin av dystunum kunnu nú væntast at vera meira javnir og mennandi, sigur Ásla og leggur afturat.

**“Eg livi gerandisdagin sum fulltíðarprofessionell, har eg kann hugsavna meg um venjing, hvíld og sum heild fyrireiking til næstu venjing”**

– Vit mennast av at spæla dystir, og tá vit enntá spæla dystir, har vit eru meira á bóltinum og við til at skapa spælið, so mennast vit enn meira. Tí er tað altavgerandi fyri okkum at fáa fleiri tílíkar dystir, har vit veruliga kunnu arbeiða við okkara fótbóltsspæli, sigur hon.

Umframt fótbóltsligu menningina, so heldur Ásla eisini, at nýggi kappingarleisturin kann fáa jaliga ávirkan á hugburðin og umdømið hjá landsliðnum og áskoðanina á kvinnufótbóltin sum heild.

– Hetta er ein stórur møguleiki fyri okkum at kunna skapa fleiri góð úrslit og tí vóni eg eisini, at hetta fer at geva okkum fleiri upplivingar við landsliðnum, har vit kunnu gera okkara fjepparar glaðar og stoltar av okkum. Tí tað hevur eisini stóran týdning fyri framtíðina og tey yngru ættarliðini, sum í dag síggja okkum sum fyrimyndir, sigur Ásla Johannesen at enda.

**Manslandsliðið**

# FØROYAR ÍMÓTI EYSTUREVROPA

# MÁLIÐ ER AT FÁA FLEIRI STIG ENN SEINAST

*Håkan Ericson fer nú undir sítt síðsta sáttmálaár sum føroyskur landsliðsvenjari, og í ár bjóðar eysturevropa av í EM-undankapping. Sviin hevur góðar vónir, og heldur, at landsliðið hesaferð skal hava meir enn tey fýra stigini, sum komu til høldar í seinastu HM-undankapping*

SMÍLIÐ HEVUR SJÁLDAN VERIÐ STØRRI. Tað var ein ovurfegin Håkan Ericson, sum tosaði við fjølmiðlarnar, eftir frálíka sigurin á Turkalandi í heyst. Tað var eydnast at vinna á eini stórari fótbóltstjóð, og Føroyar høvdu fingið sítt størsta úrslit síðan sigrarnar á Grikkalandi mitt í tíggjunum. Bólturin rullar kortini skjótt víðari, og landsliðsvenjarin tykist yvirhøvur vera ein maður, ið dámar betur at líta frameftir enn aftureftir.

Fyri framman stendur nýggj undankapping, og Føroyar skulu royna seg ímóti tveimum eysturevropeiskum risum, Póllandi og Kekkia, meðan Moldova aftur verður mótstøðulið, eins og tað var fyri tveimum árum síðan. Harafturat møta Føroyar Albania fyri fyrstu ferð, og tað verður ein spennandi avbjóðing, heldur Håkan Ericson.

– Tað er sum altíð ein stór avbjóðing, men eisini eitt hóskandi fet í okkara útvikling. Pólland og Kekkia eru sjálvandi sterk lond, meðan Albania kanska er betri, enn tey flestu geva sær fær um, sigur landsliðsvenjarin.



Gilli Rólantsson og Jóannes Bjartalíð



Håkan  Ericson, landsliðsvenjari




Føroyar vunnu á Turkalandi



Viljormur Davidsen, liðskipari á landsliðnum

## SKRÁIN 2023

24. mars: Moldova – **FØROYAR**
27. mars: N.makedónia – **FØROYAR**
*( Venjingardystur )*
17. juni: **FØROYAR** – Kekkia
20. juni: **FØROYAR** – Albania
7. sept.: Pólland – **FØROYAR**
10. sept.: **FØROYAR** – Moldova
12. okt.: **FØROYAR** – Pólland
15. okt.: Kekkia – **FØROYAR**
16. nov.: Noreg – **FØROYAR**
*( Venjingardystur )*
20. nov.: Albania – **FØROYAR**

– Tað er eitt lið, ið dugir væl við bóltinum. Vit eiga at hava kjans ímóti teimum, men kunnu ikki seta krav um, at vit skulu vinna. Vit stóðu okkum væl í Nations League í fjør, og tað verður áhugavert at finna útav, um vit megna at flyta okkum eitt stig upp í undankappingini í ár, sigur sviin, sum heldur, at málið fyrst og fremst skal vera at fáa meir stig enn í seinastu HM-undankappingini, tá úrslitið gjørdist tey fýra, sum øll komu ímóti Moldova.

Landsliðsárið 2022 byrjaði uttan Brand Hendriksson Olsen, og støðan á miðvøllinum gjørdist ikki betri í september, tá liðskiparin, Hallur Hansson, fekk álvasligan skaða í knæið, sum hevur við sær drúgvan steðg.

– Tá eg kom til Føroya, vóru teir báðir lyklaleikarar á landsliðnum – kanska saman við Jóan Símuni Edmundsson – og allir tríggir vóru ikki tøkir stóran part av kappingini í fjør, greiðir Håkan Ericson frá. Við tíðini hevur venjarin lært seg, ikki at dvølja við bakkastini, men í staðin hyggja at nýggjum møguleikum.

– At hyggja at øðrum spælarum, sum kunnu loysa av, men eisini at laga spælskipan og stíl eftir teimum, sum eru á vøllinum.

**"Jóannes hevur flutt seg nógv í 2022. Vit kenna persónligu trupulleikarnar, sum hann hevði at dragast við"**

Júst tað, heldur venjarin, eydnaðist nøkulunda í fjør, har landsliðið uttan Brand valdi at spæla meir beinleiðis, so eingin varð tvingaður inn í spælskiparaleiklutin, sum skaddi skálvíkingurin meistrar so væl.

## BJARTALÍÐ TÓK AV

Ein av teimum, sum so líðandi fekk møguleikan at seta sín dám á miðvøllin, var Jóannes Bjartalíð. Klaksvíkingurin, sum nú spælir í Fredrikstad í Noregi, tók av, og var við sínum málum og uppleggjum helst besti spælarin í hvítu landsliðstroyggjuni í fjør.

– Hansara spæl í summar og út á heystið var avgerandi fyri tey góðu úrslitini, sum vit fingu, staðfestir Håkan Ericson.

– Jóannes hevur flutt seg nógv í 2022. Vit kenna persónligu trupulleikarnar, sum hann hevði at dragast við, men at hann nú hevur fingið bilbugt við teir, hevur sjálvandi størstan týdning. Eftir hetta tók tað honum tíð at koma aftur í rætta lagið, og hann hevði smáskaðar í vár. Í summar var nær við, at vit máttu skifta hann út úr hópinum, men hann kom fyri seg, og síðan gekk betur og betur, og nú skal hann halda fram við menningini, sigur Håkan Ericson, sum rósar miðvallaranum fyri at taka av, tá kjansurin var har.

## FLEIRI HAVA SKIFT FELAG

Fleiri av teimum, sum hava spælt nógv á landsliðnum undir Håkani Ericson, hava skift felag í vetur. Ein av teimum er áðurnevndi Jóannes Bjartalíð, sum síðan hevur tikið ímóti Brandi Hendriksson Olsen í Fredrikstad. Klæmint Andrasson Olsen fór úr barndómsfelagnum, NSÍ, sum í ár spælir í 1. deild, til Íslands, har hann vónandi skal spæla undir liðini á Patriki Johannesen í álopinum hjá Breiðabliki. Pætur Petersen er eisini farin til Íslands, meðan virkandi liðskiparin á landsliðnum, Viljormur Davidsen skal spæla í Føroyum fyri fyrstu ferð í meir enn 10 ár.

– Yvirhøvur dámar mær, at føroysku spælararnir fara uttanlands at vinna sær royndir á hægri stigi í øðrum kappingum, men eg havi ilt við at meta um, hvussu nógv til dømis eitt skifti til Íslands gevur, men tað er spennandi, at teir skulu spæla saman, sigur Håkan Ericson.

– Hjá Klæminti, sum hevur spælt í sama felagi alt lívið, meti eg, at tað kann koma honum væl við at sleppa at royna lívið sum yrkisspælari, har hann verður noyddur at prógva sínar dygdir á einum nýggjum liði, leggur landsliðsvenjarin afturat.

**"Yvirhøvur dámar mær, at føroysku spælararnir fara uttanlands at vinna sær royndir á hægri stigi"**

– Hinvegin hevur Viljormur spælt í nógv ár við feløgum, sum í stóran mun hava stríðst fyri at sleppa undan niðurflyting. Tað verður kanska gott fyri hann at sleppa at royna seg á einum liði, sum hevur bóltin nógv og helst verður partur av oddastríðnum. Afturat hesum, verður tað sjálvandi frálíkt hjá honum, at verða nærri konu og børnum, sigur Håkan Ericson, sum ikki stúrir fyri, at vinstri bakkurin verður ov makligur, nú hann er aftur í Føroyum.

– Hann tekur fótbóltin í fullum álvara, og eg vænti heldur, at HB fær gott av at fáa Viljorm í hópin.

62 ára gamli sviin, sum kom til Føroyar í 2019, fer nú í gongd við sítt síðsta sáttmálaár. Spurdur, um hann fer at leingja sáttmálan, er Håkan Ericson fáorðaður, men vísir ikki aftur, at tað er ein møguleiki.

– So leingi sum eg haldi, at vit flyta okkum rætta vegin og ikki eru bangin fyri at taka neyðugar avgerðir. Tá hugsi eg bæði um okkum leiðarar, spælararnar, men eisini um, hvat Fótbóltssambandið kann gera fyri at optimera okkara kjansir í altjóða fótbólti. Tað verður sjálvandi ein avgerð, sum skal takast, tá teir bitarnir eru komnir upp á pláss, sigur Håkan Ericson til endans.

# VAKTARSKIFTI Á U21

# TAÐ BÆÐI MOTIVERAR OG FORPLIKTAR

*Eyðun Klakstein er nýggjur venjari hjá føroyska U21-landsliðnum, sum í ár fer undir nýggja EM-undankapping. Góðu úrslitini, sum U21-menninir fyrr hava fingið, bæði motivera og forplikta, heldur nýggi venjarin*



*Eyðun Klakstein, U21 landsliðsvenjari*

TAÐ FYLGIR EIN ÁVÍS ÁBYRGD VIÐ, tá tú tekur við U21-venjarastarvinum, og tað tykist nýggi landsliðsvenjarin, Eyðun Klakstein, vera greiður yvir. Eitt er, at elsta ungdómslandsliðið fekk fleiri góð úrslit í síðstu undankapping, men hyggur ein í søgubøkurnar hevur júst hesin aldursbólkurin staðið fyri fleiri av bestu úrslitunum í føroyskari landsliðssøgu.

– Tað bæði motiverar og forpliktar, sigur Eyðun Klakstein ivaleysur.

– Tá tú tekur við venjarasessinum, veitst tú, at onnur hava fingið góð úrslit frammanundan, og so forpliktar tað, og tú skalt út at vísa teg.

Hinvegin eggjar hetta eisini til nýggjan innsats hjá bæði venjarum og spælarum.

– Tí tú veitst, at hetta er ikki bert ein venjari ella eitt lið, sum hevur fingið góð úrslit. U21-landsliðið hevur jú avrikað væl og hevur fingið einstøk fantastisk úrslit, so tað er eisini ein møguleiki at fara eftir onkrum ordiliga stórum.

## TAÐ SNÝR SEG UM ÚRSLIT

Spælarar skulu mennast og gerast til reiðar at umboða føroyska A-landsliðið – yvirskipað er tað endamálið við øllum ungdómslandsliðunum hjá Fótbóltssambandi Føroya – men eldri teir verða, meir hava avrik og úrslit at siga, heldur Eyðun Klakstein.

> **“Fyrstu árini spælir menningin nógv størri leiklut enn úrslitini”**

– Fyrstu árini spælir menningin nógv størri leiklut enn úrslitini, staðfestir nýggi U21-venjarin.

– Og tá vit koma til U21-landsliðið, tosa vit um vaksnar spælarar. Hetta eru spælarar, sum eru í bestu hópunum í sínum felagi, og tá snýr tað seg í størri mun um avrik og úrslit. Tað fylgir kortini ein stórur menningarmøguleiki við hjá spælarum, sum í onkrum førum sleppa at spæla 10 landsdystir upp á tvey ár.

Tá nýggj undankapping byrjar hava fleiri spælarar takkað fyri seg á U21-liðnum, meðan ein nýggjur árgangur sleppur at royna seg. Síðan eru nakrir, sum halda fram á liðnum, og í hesum bólkinum eru fleiri, sum longu í seinstu kapping longu høvdu lutfalsliga stóran leiklut, og tað kemur Eyðuni Klakstein til góðar, tá nýggja liðið skal spælast saman.

– Teir hava verið yngri, men høvdu longu týðandi lut í undanfarnu kapping. Spælarar sum til dømis Børge (Petersen, red.), Noah (Hans Mneney, red.) og Samuel (Johansen Chukwudi, red.). Hesir fáa nú enn størri ábyrgd, og so koma teir nýggju inn afturat, og ímillum teirra eru fleiri spennandi spælarar, greiðir Eyðun Klakstein frá.

Hann vísir á, at talan er um eina undankapping, sum varðir í tvey ár, og tí kann nógv henda á vegnum, ikki minst við teimum spælarunum, sum eru í yngra árganginum.

– Brádliga kann onkur gera eitt lop í menningini, sum tú kanska ikki hevði roknað við, so tað verður spennandi at fylgja við hesum ungu monnunum og vita, hvør flytir seg mest og kanska tekur okkum á bóli, sigur Eyðun Klakstein.

## HVØRKI EIN DREYMUR ELLA EIN MARRA

Tá lutakast var til undankappingina í Nyon í Sveis fyrst í februar, sá Eyðun Klakstein Portugal, Kroatia, Grikkaland, Hvítarussland og Andorra koma úr UEFA-bollanum. Hann er glaður fyri, at Føroyar fingu fimm mótstøðulið, altso 10 dystir, men annars kundi tað bæði verið betri og verri.

– Vit fingu nokkso sterk lond í teimum ymisku styrkisbólkunum. Tað næststerkasta í fyrsta bólki, tað sterkasta í øðrum bólki og tað næststerkasta í bólki 3, sigur Eyðun Klakstein.

– Hinvegin síggja vit heilt sikkurt møguleikan at vinna onkrar dystir og at gera okkurt ordiliga stuttligt, sigur nýggi venjarin, sum skal standa á odda fyri síni fyrstu landsliðssamling í mars, áðrenn Andorra vitjar á Tórsvølli í juni.

> **“Tað verður spennandi at fylgja við hesum ungu monnunum”**

### EYÐUN UM STÓRA STARVIÐ

Eyðun Klakstein hevur avloyst Sámal Erik Hentze sum U21-landsliðsvenjari. Hetta sigur hann um nýggju avbjóðingina:

– Eg eri øgiliga spentur upp á uppgávuna. Hetta er ein góð avbjóðing at fáa. Eg sleppi at arbeiða við einum U21-landsliðið, sum spælir landsdystir í runt í Evropa. Hetta eru evnaríkir spælarar, sum eru á veg til at blíva toppspælarar í Føroyum. Starvið er fakliga krevjandi og avbjóðandi, og júst tað dámar mær væl.

### U21 SKRÁIN 2023

| 2023 | 2024 |
|---|---|
| 16. juni: **FØROYAR** – Andorra | 21. mars: Portugal – **FØROYAR** |
| 7. sept.: Hvítarussland – **FØROYAR** | 5. sept.: Kroatia – **FØROYAR** |
| 12. sept.: **FØROYAR** – Kroatia | 10. sept.: **FØROYAR** – Grikkaland |
| 17. okt.: Andorra – **FØROYAR** | 11. okt.: **FØROYAR** – Portugal |
| 16. nov.: Grikkaland – **FØROYAR** | 15. okt.: **FØROYAR** – Hvítarussland |

U16 landsliðini

# NÝGGJ LANDSLIÐ SKAPA MØGULEIKAR FYRI ENN FLEIRI SPÆLARAR

*Vit hava skift orð við Eyðvør Jakobsen og Fróða Benjaminsen, ið um ársskiftið vórðu kunngjørd sum høvuðsvenjarar hjá nýskaptu U16 landsliðunum við ávíkavist gentum og dreingjum*



***"Ofta hevur tú eina góða hóming av, hvørjar dygdir spælararnir hava og nakrir spælarar eru jú eyðsýndir. Slík viðurskifti síggja vit væl til landsliðsvenjingar"***

*Fróði Benjaminsen, landsliðsvenjari hjá U16 dreingjum*

**UNGDÓMSLANDSLIÐSVIRKSEMIÐ** hjá Fótbóltssambandi Føroya er vaksið nógv seinnu árini, og í 2022 spældu føroysku U-landsliðini tilsamans 50 dystir. Á gentu og dreingjasíðuni hava Føroyar U15, U17 og U19 landslið, umframt at U21 landslið eisini er á manssíðuni.

Um ársskiftið varð tó kunngjørt, at U16 landslið verða løgd afturat á báðum síðum, og í sama umfari eru høvuðsvenjarar settir í fulltíðarstørv at standa á odda fyri U16 og U17 landsliðunum. Eyðvør Jakobsen er sett at stjórna gentusíðuni, meðan Fróði Benjaminsen er settur á dreingjasíðuni.

### FLEIRI SKULU FÁA MØGULEIKAN

Meðan Fróði frammanundan starvaðist hálva tíð á fótbóltsdeildini hjá FSF, hevur Eyðvør áður starvast sum námsfrøðingur og verið venjari í ungdómsfótbólti og hjálparvenjari á U19 gentulandsliðnum.

Bæði eru tey samd um, at tey sum landsliðsvenjarar leggja seg eftir at síggja so nógvar spælarar sum gjørligt. Ígjøgnum úrvalsvenjingarnar hjá FSF og í sínum fyrrverandi leikluti sum hjálparvenjari á U17 dreingjalandsliðnum, kennir Fróði Benjaminsen longu nógvar av teimum spælarunum, sum nú hava aldur til U16 og U17. Hjá Eyðvør fara fyrstu venjingarnar hinvegin at geva henni møguleika fyri at síggja nógvar spælarar, sum hon ikki kennir so væl frammanundan.

Hóast hetta verður gjørt við fleiri úttøkuvenjingum, so leggur hon samstundis dent á, at landsliðsvenjingar ikki skulu vera tað einasta, hon hevur at grunda sínar úttøkur á.

– Ofta hevur tú eina góða hóming av, hvørjar dygdir spælararnir hava og nakrir spælarar eru jú eyðsýndir. Slík viðurskifti síggja vit væl til landsliðsvenjingar, og tað gevur eisini teimum bestu spælarunum úr ymsu feløgunum møguleika fyri at blíva "matchaðar" væl undir venjing. Men eg haldi eisini, at tað hevur stóran týdning at síggja spælararnar í sínum trygga umhvørvi. Tað

***"Eg var sjálvur ikki úttikin til tey yngru landsliðini, tí aðrir vóru fysiskt langt frammanfyri meg tá, men eg helt fram við venjingini og tók fótbóltin í álvara, og tað gav eisini úrslit"***

hava teir jú í sínum felag, og har ætli eg mær at vitja so nógv, sum yvirhøvur til ber, sigur Eyðvør Jakobsen.

Starvsfelagi hennara á dreingjasíðuni leggur eisini dent á, at spælarar mennast ógvuliga ymiskt í júst hesum aldursbólkunum.

– Teir, sum roynast væl í U16 og U17 aldri eru als ikki altíð teir, sum enda á A-landsliðnum. Hetta er ofta orsakað av stóru kropsligu broytingunum, sum koma við kynsbúningini í tannárunum, har nógv kann henda uppá lutfalsliga



*Eyðvør Jakobsen, landsliðsvenjari hjá U16 gentum*

stutta tíð. Tí eri eg eisini altíð tilvitaður um at minna spælararnar á, at ein landsliðsúttøka í hesum aldrinum er ikki garantur fyri, at viðkomandi spælari eisini endar á A-landsliðnum. Teir frávaldu í hesum aldrinum hava ofta góðar møguleikar fyri at innheinta seinni í ungdóminum, og teir sum nú hava fysiskan fyrimun, mugu framvegis kíta seg og venja væl fyri at mennast framhaldandi sum vaksnir spælarar, sigur Fróði Benjaminsen.

Sjálvur eigur hann framvegis metið fyri flestar A-landsdystir sum spælari, og í hesum sambandi tosar hann veruliga av egnum royndum.

– Eg var sjálvur ikki úttikin til tey yngru landsliðini, tí aðrir vóru fysiskt langt frammanfyri meg tá, men eg helt fram við venjingini og tók fótbóltin í álvara, og tað gav eisini úrslit, tá vit komu upp í vaksnamannadeildirnar, leggur hann afturat.

### KUNNU FYLGJA SPÆLARUNUM TÆTTARI

Hóast landsliðsfótbóltur fyrst og fremst verður spældur á leikvøllinum, so er tað eisini ein partur av arbeiðnum hjá ungdómslandsliðsvenjarunum at taka atlit til heildarstøðuna hjá spælarunum, soleiðis at ungu leikararnir hava bestu fortreytir fyri at mennast og trívast.

U16/17 aldursbólkurin er ofta umbiðin í fleiri deildum í feløgunum, og í fleiri førum eru spælararnir eisini virknir í øðrum ítrótti. Hetta eru tey bæði sera tilvitaði um.

– Yvirskipað eru hetta spælarar, sum venja nógv og ofta við fleiri ymiskum deildum. Tað vil siga, at venjingarmongdin kann vera í meira lagi, um vit ikki skipa okkum og fylgja við í gerandisdegnum hjá spælarunum. Har royni eg í øllum førum at vera tilvitaður um, nær og hvussu vit venja við landsliðnum og samstundis eisini samskifta væl við spælararnar sjálvar og feløgini um, hvussu venjingarstøðan hjá teimum er, sigur Fróði.

**“Eg havi eisini stóran áhuga í at samskifta við venjararnar í feløgunum um, hvat tey halda um støðið og møguleikarnar fyri at menna spælararnar”**

Hesum tekur Eyðvør undir við, og hon ætlar eisini at samskifta nógv við venjararnar úti í feløgunum.

– Eg eri sera tilvitað um at skapa eitt gott samstarv við venjararnar, sum hava spælararnar í feløgunum. Sjálvandi er tað mín uppgáva og ábyrgd sum landsliðsvenjari at meta um spælararnar og taka liðið út, men eg havi eisini stóran áhuga í at samskifta við venjararnar í feløgunum um, hvat tey halda um støðið og møguleikarnar fyri at menna spælararnar, sigur Eyðvør.

– Vit hava at gera við spælarar, sum umframt fótbóltin eisini hava nógv annað at fyrihalda seg til. Gerandisdagurin kann vera eitt putlispæl við venjing, skúla, familju, vinfólki og kanska einum frítíðararbeiði eisini, og tað skulu vit hava í huga, leggur hon afturat.

### LOYPA BEINT ÚTÍ TAÐ

Fyrstu vikurnar í nýggju leiklutunum brúka tey hvør í sínum lag uppá at fyrireika seg og hóparnar til teir mongu dystirnar, sum longu eru á skránni í vár.

Eyðvør og U17 genturnar byrja við EM undankapping í Litava í mars, og í apríl fer hon til menningarkapping á Malta við U16 gentum. Um somu tíð skulu U16 dreingirnir hjá Fróða til menningarkapping í Nýsælandi og beint eftir hetta fer hann við U17 dreingjum til menningarkapping í Albania.

Sostatt er skráin full í dystarvirksemi fyrstu tíðina, og seinni í vár/summar verður so betri tíð til gerandisdagar við tøttum samstarvi við feløgini, ímeðan landsliðini tá skulu fyrireikast til fleiri dystir í seinsummar og í heyst.



*Dómarar*

# NÝGGJAR ÆTLANIR Á DÓMARAØKINUM

*Umframt at vera royndasti og hægst metti føroyski FIFA dómarin, er Kári á Høvdanum eisini í starvi hjá FSF við áherðslu á tilgongd og menning av nýggjum dómarum. Vit hava skift orð við fryntliga gøtumannin um avbjóðingarnar í komandi árinum*



*Kári á Høvdanum, dómari*

UM ÁRSSKIFTIÐ GJØRDIST greitt, at Jóhan Hendrik Ellefsen er nýggjur á listanum í 2023 yvir føroyskar FIFA dómarar. Hann avloysir Alex Troleis, samstundis sum Jørleif Djurhuus legst afturat sum føroyskur FIFA hjálpardómari.

Kári á Høvdanum, ið sjálvur hevur verið FIFA dómari síðan 2017, og higartil er komin í dómarabólk 2 yvir altjóða dómarar – sum fyrsti føroyingurin nakrantíð – heldur tað vera gleðiligt, at fleiri sleppa út at royna seg á altjóða leikvøllum.

– Tað er gleðiligt, at Jóhan Hendrik nú eisini sleppur at royna seg við døming uttanlands, og harumframt hava vit fyri fyrstu ferð fýra góðkendar FIFA hjálpardómarar. Tað hevur stóran týdning, at vit framhaldandi virka fyri at hækka støðið og seta við á dómaraøkinum, sigur Kári á Høvdanum.

Sjálvur er hann bólkaður til at kunna døma eitt nú bólkadystir í stóru evropeisku kappingunum fyri feløg, men næsta málið hjá Kára er greitt.

– Eg strembi eftir at blíva ásettur til ein A-landsdyst. Tað havi eg enn til góðar at uppnáa, og tað er helt víst mítt næsta mál, sigur Kári, sum saman við Jóhan Hendriki Ellefsen eisini hevur tikið VAR skeið.

– Í mun til VAR skulu vit enn ígjøgnum fleiri venjingar, áðrenn vit kunnu ásetast sum VAR dómarar, men tað er eisini ein spennandi avbjóðing, sum vónandi ikki er alt ov langt burturi. VAR verður sum kunnugt ikki brúkt í heimligu kappingini, og tí mugu vit enn av landinum fyri at venja tann partin, greiðir Kári frá.

**“Framhaldandi virka fyri at hækka støðið og seta við”**

### SJÓNEYKAN Á TILGONGD OG MENNING

Umframt sína egnu yrkisleið við floytuni, starvast Kári á Høvdanum eisini hálva tíð hjá Fótbóltssambandi Føroya, har hann serliga fæst við rekruttering og menning av nýggjum dómarum.

Tað er ein sannroynd, at tað skulu nógvir dómarar til at avgreiða mongu dystirnar í kappingarárinum, og tí er tað týdningarmikið arbeiði, sum Kári nú er farin undir í nýggja starvinum.

– Fokus hjá mær er serliga á tveimum økjum. Annað er at fáa fleiri dómarar til, og kanska serliga hvussu vit fáa fleiri kvinnur við sum dómarar. Umframt at vit vilja skipa fyri átøkum fyri at fáa fleiri dómarar, so koma vit eisini út í feløgini og vilja fegin samstarva við tey, soleiðis at dømingin eisini fær enn meira uppmerksemi kring landið, sigur Kári á Høvdanum, áðrenn hann leggur afturat.

– Hitt fokusøkið er menningin og stuðulin til teir breiddardómararnar, sum vit longu hava í skipanini. Her snýr tað seg um hjá okkum at vegleiða tey eftir lokið dómaraskeið, tá sjálv leiðin sum virkin dómari byrjar. Í nøkrum førum vita vit eisini, at fólk taka skeiðið og standa royndina uttan trupulleikar, men síðan mangla dirvi til at taka næstu fetini út á sjálvan vøllin. Tí skulu vit eisini megna at lofta og stuðla teimum við hjálp og vegleiðing, sigur Kári.

### VIÐLÍKAHALD HEVUR STÓRAN TÝDNING

Eitt annað, sum Kári fegin vil varpa ljós á, er stóra týdningin av, at dómarar halda sín kunnleika við líka og fylgja við í broytingunum, sum jú javnan henda í fótbóltslógini.

– Tað hevur stóran týdning, at man heldur seg í venjing og dagførdan við eitt nú lesing og uppfrísking av fótbóltslógini, og hetta hava vit nú sett onkur átøk í verk fyri at varpa ljós á. Hetta hevur bæði týdning í mun til tær broytingarnar, sum verða framdar í lógini, men tað er eisini sera gevandi at lesa uppá í samband við meira sjáldsamar støður, sum kunnu íkoma. Um vit bara døma út frá royndum, so kunnu vit raka blindvinklar í støðum, sum uppstanda sera sjáldan. So menningin kann allatíðina halda fram hjá okkum øllum, óansæð hvussu roynd ella óroynd vit eru, sigur Kári á Høvdanum at enda.

*Nýggja vestursíðan*

# RUNDFERÐ Á TÓRSVØLLI

*Fýra hæddir við nýggjum plássi og kørmum til fótbóltin. Nýggja vestursíðan á Tórsvølli fevnir um eini 1000 sitipláss uttanveggja, og innanveggja eru karmar til tað mesta av tí, sum eitt altjóða stadion skal bjóða. Her er ein myndarundferð, har tú sleppur við úr enda í annan.*



**▶ Umklæðingarrúmini á langsíðuni eru innrættaði so, at til ber at hava fýra lið inni í senn. Til størru dystirnar (eitt nú A-landsdystir hjá monnum og kvinnum), verður tó latið upp millum rúmini á heima- og útisíðuni, soleiðis at umklæðingarrúmini gerast størri. Umframt umklæðingarrúm til spælarar og venjarar, eru eisini góðir karmar til dómarar og læknarúm.**





**▼ Tá liðini koma á Tórsvøll við bussum, koma spælarar og venjarar inn í kjallaranum, og síðan upp trappurnar til sjálvan spælaratunnilin, fyri at koma til umklæðingarrúmini, sum eru staðsett í veghædd. Tað er eisini í tunnlinum, at liðini hittast fyri at ganga inn á vøllin áðrenn dystarbyrjan, og eftir dystin er ein partur av hesum økinum eisini karmur um samrøður við miðlarnar.**



**◀ Ovasta hæddin rúmar í størstan mun skyboksum, sum verða brúktar til gestir í samband við dystir og annars fundir og annað virksemi í gerandisdegnum. Boksirnar eru leigaðar út til fyritøkur, sum sjálvar innrætta og skipa sítt virksemi í hølunum. Á myndini sæst FSF skyboksin, har ymiskar søguligar myndir prýða veggin.**





*Á 1. hædd eru flestu fermetrarnir brúktir til stór og rúmlig høli til stórar móttøkur og samkomur, eitt nú til VIP móttøkur í samband við dystir. Harumframt er góður køkur á hæddini og vesi til áskoðarar.*



**◀ Í Veghæddini finna vit eisini Trinstovu, sum er eitt auditorium við sitiplássum til eitt nú framløgur og tíðindafundir.**

**▶ Uttandura á ovastu hædd liggja arbeiðsplássini til frásøgufólk og skrivandi miðlar væl fyri, og harumframt eru restin av setrunum áskoðarapláss tilhoyrandi skyboksirnar.**



**▲ Kunning til áskoðarar og tónleikurin í samband við dystir á Tórsvølli, verða stýrd úr frásøgurúminum á ovastu hædd. Hetta rúmið er harumframt knýtt at kontrollrúminum hjá vakthavandi og trygdarovasta í samband við stórar dystir.**





**▲ Umframt, at kjallarin undir Vestursíðuni er inngongd fyri liðini, sum koma á Tórsvøll at spæla dystir, so rúmar hæddin eisini útgerðini og klæðunum hjá FSF. Her verða leikbúnar og útgerð til landsliðini gjørd klár, prentaði, vaskaði og goymd. Harumframt er eisini eitt venjingarrúm í kjallaranum við fitnessútgerð, har eitt nú skaddir spælarar kunnu hugsavna seg um endurvenjing undir landsliðssamlingum.**

# FYLG VIÐ FRÁ SNILDFONINI LÆTT OG ÓMAKALEYST

*Við appini "FSF fótbóltur" hava øll fótbóltsáhugaði nú lætta atgongd til kunning og dagføring um dystir og kappingar*




**SÍÐAN 2017 HEVUR** Fótbóltssamband Føroya brúkt skrásetingarskipanina Comet til skráseting og stýring av øllum dystarvirkseminum í føroyskum fótbólti. Talan hevur verið – og er framvegis – um eina umfatandi tilgongd at talgilda og skipa kappingarvirksemið. Ása Klakkstein Kalsø, sum samskipar hetta fyri FSF, greiðir soleiðis frá skipanini.

– Í stuttum er Comet dátubasan hjá FSF, har allir spælarar, venjarar og dómarar eru skrásettir. Tað er eisini her, allar kappingarnar hjá FSF verða lagdar, dystir verða fyrireikaðir og dómaraseðlar eftir loknan dyst verða skrásettir. So í veruleikanum er talan um eina týdningarmikla skipan fyri dystar- og kappingarvirksemið í føroyskum fótbólti, sigur hon.

Sostatt inniheldur skipanin eisini eina stóra mongd av dátum og viðkomandi vitan fyri fótbóltsáhugað. Eitt nú spælaraskrásetingar, dystar- og kappingarskráir, stigatalvur, hagtøl og so framvegis. Men fyri at sleppa inn í skipanina, er neyðugt hjá samskiparum og øðrum at rita inn við brúkara, og av dátuverndarorsøkum ber sjálvsagt ikki til at lata alla skipanina upp fyri almenninginum.



***Ása Klakkstein Kalsø, Comet-samskipari hjá FSF***

**APPIN EITT HENT AMBOÐ**

Ein stórur partur av upplýsingunum úr skipanini eru tó tøkar alment, og talan er í stóran mun um viðkomandi vitan hjá fótbóltsáhugaðum.

Ása Klakkstein Kalsø greiðir frá, at FSF nú eisini hevur eina app tøka til júst hetta endamálið, og at hendan kann vera eitt sera hent amboð hjá fótbóltsáhugaðum at hava í lummanum, tá kappingin hjá børnum og vaksnum fer av bakkastokki.

– Við appini fært tú atgongd til eitt nú leikskráir, stigatalvur og dómaraseðlar. Sostatt kanst tú fylgja gongdini í teimum kappingunum, sum hava tín áhuga. Hetta kemur serliga væl við, tá hugsað verður um barna- og ungdómskappingar, sum hava stóran áhuga millum foreldur og avvarðandi annars, sigur Ása Klakkstein Kalsø.

Allar kappingar frá U7 og heilt upp í vaksnamannadeildirnar verða lagdar í skipanina, so har ber altíð til at síggja leikskráir, umframt leikstað og klokkutíðir, tá hesi eru ásett. Har arbeiðir FSF eisini út frá regluni um, at kunningin á Comet altíð er tann, ið er galdandi. Frá U13 og uppeftir verða úrslit eisini skrásett í skipanini, so tá ber eisini til at fylgja við úrslitum og stigatalvum í appini.

Sum eitt eyka prei leggur Ása afturat, at tað sum fjeppari er skilagott at velja sær nakrar "favorittar" í appini.

– Hjá foreldrum og øðrum avvarðandi er tað ofta mest viðkomandi at halda seg kunnaði um nakrar ávísar deildir ella ávísum liðum. Í appini kanst tú velja hesi sum tíni yndis við at trýsta á stjørnuna ovast í høgra horni, og so fært tú boð á snildfonini, so hvørt sum dagføringar koma í skipanina. Tað ber eisini til at fylgja ávísum spælarum, eitt nú ungum spælarum, sum spæla í fleiri ymiskum deildum, fortelur hon.

**"Skipanin gevur møguleika fyri at fylgja við liðuppstillingum, skoraðum málum og kortum í live-dagføringum"**

**FEVNIR EISINI UM LANDSDYSTIR**

Comet skipanin og tilhoyrandi appin FSF Fótbóltur gevur heilt nógvar møguleikar, men tað er sjálvandi og framhaldandi ein treyt, at hendingar og dagføringar leypandi verða lagdar inn í skipanina.

Umframt heimligu kappingarnar, verður skipanin eisini brúkt til landsdystir, og í hesum sambandi er ætlanin at gera enn meira fyri at leggja dagføringar inn í appina, tá ið ungdómslandsliðini spæla dystir á útivølli.

– Skipanin gevur møguleika fyri at fylgja við liðuppstillingum, skoraðum málum og kortum í live-dagføringum. Hetta krevur tó sjálvandi, at onkur á staðnum leggur dáturnar inn í skipanina, meðan dysturin er í gongd, og vit vóna í framtíðini at kunna royna hetta í samband við útidystir hjá ungdómslandsliðunum, har tað annars ikki altíð er beinleiðis miðling av dystunum, sigur Ása Klakkstein Kalsø at enda.





# NÝGGJ LJÓS-SKIPAN Á OVARA VØLLI

*Nýggja ljósskipanin á Ovara vølli bleiv fyrr í vetur tikin í nýtslu. Ljósskipanin lýkur krøvini Fótbóltssamband Føroya setur í Vallarreglugerðini 2022 til ljósskipanir á vøllum til dystir í Betri-deildini*

Á OVARA VØLLI hevur umsitingin hjá Tórshavnar Kommunu saman við veitarum og ráðgevum arbeitt við, eisini at tryggja, at ljósdálkingin til grannalagið verður avmarkað. Nýggja ljósskipanin lýkur tí EU-standardin DS/EN12193 fyri ljósdálking við "Sportbelysing".

## FRAMTÍÐAR-TRYGGJAÐ

– Hetta er ein sera góð og framkomin skipan við LED-ljósum. Tað hevur við sær, at tað er eingin ljósdálking av skipanini, og hon fer tí ikki at órógva grannar og onnur. Hetta er í veruleikan ein so grøn skipan, sum yvirhøvur gjørligt, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

Hann greiðir frá, at harumframt er 10 ára rakstrartrygd á skipanini, soleiðis at kommunan ongar útreiðslur fer at hava av ljósskipanini næstu 10 árini.

– Vit arbeiða somuleiðis við at fáa eina líknandi ljósskipan við vøllin í Vika úti á Argjum, og pengar eru settir av til tað, sigur borgarstjórin.

Talan er eisini um eina sera brúkaravinarliga skipan, sum ábyrgdarfólk í fótbóltsfeløgunum, ið brúka ovara vøll, kunnu tendra og sløkkja umvegis fartelefonina.

**"Tað er eingin ljósdálking av skipanini, og hon fer tí ikki at órógva grannar og onnur. Hetta er í veruleikan ein so grøn skipan, sum yvirhøvur gjørligt"**

## EINGIN TRUPULLEIKI VIÐ KVØLDARDYSTUM

Ljósskipanin, útgerð og stýringsskipan til hesa, er veitt av donsku fyritøkuni NorthLED Aps. Uppsetingin av ljósskipanini, umframt annað elarbeiði, er veitt av Tummasi Eli Hansen EL-innleggjara. MEST hevur veitt og tilevnað stálið.

Ráðgeving í sambandi við el-innleggingar og eftirkanningar av mastrum v.m. er gjørt av LBF, ráðgevandi verkfrøðingum.

Gamla ljósskipanin var slitin og ikki nøktandi, og av somu orsøk blivu kvøldardystir, ið eftir ætlan skuldu spælast á Ovara Vølli, farna kappingarár sum oftast fluttir yvir á Tórsvølli, har ljósumstøðurnar vóru betur.

Men nú er ljósviðurskiftini á Ovara Vølli fyrsta flokks, so nú er eingin forðing fyri at spæla dystir har seint um kvøldið.

# NÆR FARA VIT AT FOSTRA TANN NÆSTA TODA JÓNSSON?



## *Klumman*

**Uni Leitistein Hansen**

Hann stendur enn negldur í mínum minni hesin piltadysturin á grúsvøllinum við Løkin í Runavík eina ferð í fyrru helvt av áttatiárunum.

Vit í NSÍ skuldu spæla móti Kía, og boðini frá venjaranum til mín vóru greið:

“Uni, tú skalt mansverja Toda. Hann er nummar 10. Allastaðni Todi fer, fert tú eisini, okey?”

Eg havi neyvan verið meira enn níggju ára gamal, og tá í tíðini spældu vit, piltar, á heilum vølli við stórum málum. Bara at koma fram á hálvan vøllin tók eina góða løtu við mínum stuttu beinum, og tá var mann bara komin helvtina av vegnum, um mann altso ætlaði fram at skora eitt mál.

Kí hevði ein serligan leikara, ið var so góður, at hann, longu sum 10 ára gamal, var landskendur. Ein klæntrasligur piltur við purlutum hári, hvørs fótbóltsevni vóru langt út yvir tað vanliga.

At billa sær inn, at eg kundi gera nakað fyri at steðga Toda, var í grundini rættiliga langt úti. Todi Jónsson var ófatiliga skjótur fyri ein pilt at vera - tað var eg ikki. Todi var ein bóltsnillingur av Guds náði – tað var eg ikki. Todi var besti spælarin í landinum – tað var eg ikki. Í grundini kanst tú siga, at alt tað, ið Todi Jónsson var á einum fótbóltsvølli, ja, tað var eg ikki. Tí endaði Todi sum yrkisleikari, og eg siti og skrivi hesa klummuna fyri FSF.

Eg minnist hendan piltadystin við Løkin sum tann ræðuligasta fótbóltsdystin, eg nakrantíð havi spælt. Frá tí at dómarin setti dystin ígongd, sá eg ikki í halaferðina á hesum hvirluvindi av einum pilti. Hvørja ferð eg, við mínum stuttu beinum, hevði runnið meg fram til har, Todi var á stóra vøllinum, so var hann burtur aftur. Og hendi tað, at eg var nær námindis Toda, tá ið hann fekk bóltin, so sneiddi hann meg av, sum var eg luft, og so var hann vekk aftur.

Tað einasta, ið eg kann ugga meg við í dag, tá ið eg hugsi aftur á hesa eyðmýkjandi uppliving á grúsvøllinum við Løkin, er, at hesin pilturin, ið helt meg fyri tað turra spott, enn í dag er tann besti leikarin, ið Føroyar nakrantíð hava fostrað. Og tað er í grundini eitt sindur syrgiligt og eitt tekin um, at okkurt ikki ruggar heilt rætt í føroyskum fótbólti. Todi Jónsson er farin um tey fimti, og eg komi, eins og í piltadeildini, tuskandi eitt sindur aftan fyri hann.

Hví fostra vit ikki fleiri Toda Jónssynir? Hondbóltsspælarar hava í tvey ár á rað ruddað borðið í sambandi við árliga ítróttarFAGNAÐIN, og tað er ikki so undarligt, tí eftir summarfrítíðina spæla ikki færri enn tríggir føroyskir hondbóltsspælarar við toppliðum í heimsins bestu hondbóltsdeild, týsku Bundesliguni. Elias Ellefsen á Skipagøtu við THW Kiel, Hákun West av Teigum við Füchse Berlin og Jóhan á Plógv Hansen við SG Flensburg-Handewitt. Og so er tað bara ein spurningur um tíð, inntil Óli Mittún fer aftaná. Hetta hendir, samstundis sum bestu føroysku fótbóltsspælararnir í frægasta føri spæla í bestu norsku, svensku ella íslendsku deildini.

Mann kann altíð brúka ta undanførslu, at fótbóltur er ein nógv størri ítróttagrein enn fótbóltur. Men eg haldi ikki, at mann kann renna undan tí støðu, at tað ikki koma nóg nógvir fótbóltsúrmælingar burtur úr øllum teimum pengunum og orkuni, ið verða brúkt upp á fótbólt her á landi.

Onkrir glottar hava tó verið hesi árini, síðani Todi Jónsson setti gaggurnar á hillina. Ingi Højsted, ið sum tannáringur spældi á miðvøllinum saman við eitt nú Cesc Fàbregass á ungdómsliðum hjá Arsenal, áðrenn skaðar gjørdu enda á hansara yrkisleið. Miðverjin Sonni Ragnar Nattestad, sum í síni tíð bleiv samanborin við liðskiparan á danska landsliðnum, Simon Kjær. Brandur Hendriksson Olsen hevur eisini víst, at evnini eru til meira, um skaðarnir ikki vóru so nógvir og ógvusligir. Og so skulu Hallur Hansson, Jóan Símun Edmundsson og Viljormur Davidsen hava stórt rós fyri veruliga at hava gingið á odda sum fyrimyndir fyri tí, sum skal til fyri at gerst yrkisleikari.

Men eingin teirra hevur skarað framúr, eins og Todi Jónsson gjørdi, tá ið hann spældi fyri bæði FCK og føroyska landsliðið. Sum tá ið Todi í 1995 rann frá russisku verjuni á Svangaskarði og pløkkaði bóltin upp í tríkantin. Ella tá ið hann í Parkini móti Brøndby í 1997 elegant lobbaði bóltin upp um Mogens Krogh í málinum. Og tá ið hann á útivølli í 2003 fluktaði bóltin í málið úr 40 metrum í einum Evropa Cup-dysti móti Ferencváros. Um tit ikki hava sæð málini, so googla tey.

FSF eigur at seta seg niður og spyrja seg sjálvt spurningin: Hvussu evna vit fleiri fótbóltsúrmælingar í Føroyum?

Spyrt tú meg, so haldi eg, at orsøkin er, at fótbóltur er gjørdur nógv torskildari, enn honum nýtist at vera. Hvør sending, hvør rørsla og hvørt innkast skal greinast niður í minsta smálut. Spælarar verða máldir í høvd og reyv, og úrslitið er, at nógvir spælarar ofta tykjast so proppaðir við upplýsingum um, hvat teir skulu og ikki skulu gera í øllum støðum í einum dysti, at teir í grundini fullkomiliga gloyma at spæla fótbólt.

Barnsliga gleðin at spæla við og sparka til rundu leðurkúluna, sum í dag er meira plast enn leður, er horvin í allari yvirflóðini av upplýsingum og hagtølum. Eg vænti ikki, at rørslurnar og flytingarnar hjá Messi verða nágreinaðar við teldum. Messi finnur sjálvur útav, hvar hann skal vera og nær, og hvat hann ger við bóltin, tá ið hann fær bóltin, og Messi hevur júst vunnið HM við Argentina og er kosin heimsins besti fótbóltsspælari sjey ferðir.

Í einari vangamynd í Weekendavisen av litríka venjaranum hjá danska manslandsliðnum í hondbólti, Nikolaj Jacobsen, sum júst hevur leitt Danmark til triðja heimsmeistaraheitið á rað, sigur Nikolaj Jacobsen, at hann noktar at yvirgeva seg til akademiseringina av hondbólti, sum hann málber seg. Ofta siti eg við einari kenslu av, at í fótbóltsheiminum – eisini í Føroyum – er mann farin beint øvugta vegin. Eg hugsi, at fyri at fostra fótbóltsúrmælingar, so snýr tað seg í grundini um at stimbra tann partin av fótbóltsspælinum, ið ger tað stuttligt at spæla fótbólt. Spælið.

Eg lærdi forrestin eitt handan dagin á grúsvøllinum við Løkin fyrst í áttatiárunum. Skuldi eg hava nakran kjans at klára meg móti teimum bestu fótbóltsspælarunum í landinum, so mátti sterkari lútur til frá mínari síðu. Eg lærdi snøgt sagt at takla hart, og tað fingu nógvir leikarar seinni at føla, eisini Todi Jónsson. Tað gav at bíta eina ólavsøku, tá ið Todi kom inn í eitt ball, har eg var. “Er tað tú, tín raaai fanøøø (les: rái fani).”



#SAMANFRAMÁ

LANDSLIÐS PAKKIN 2023

**Landsliðspakkin** gevur atgongd til allar heimadystirnar á Tórsvølli hjá A-landsliðnum við monnum.

**KEYP Á FSF.FO**

EURO2024 GERMANY

EUROPEAN QUALIFIERS

**Bólkur E**

**DYSTARSKRÁ 2023:**

| | |
|---|---|
| 24. mars | Moldova - Føroyar |
| **17. juni** | **FØROYAR - KEKKIA** |
| **20. juni** | **FØROYAR - ALBANIA** |
| 7. sep. | Pólland - Føroyar |
| **10. sep.** | **FØROYAR - MOLDOVA** |
| **12. okt.** | **FØROYAR - PÓLLAND** |
| 15. okt. | Kekkia - Føroyar |
| 20. nov. | Albania - Føroyar |

**KOSTNAÐUR:**

| | |
|---|---|
| Bólkarnir 103-106 | kr. 800,- |
| Bólkarnir 102 og 107-108 | kr. 600,- |
| Bólkarnir 109-110 og 112-113 | kr. 400,- |
| Bólkur 111 ***(Skansin)*** | kr. 400,- |



www.fsf.fo

KEYP HER

FÓTBÓLTSSAMBAND FØROYA


MOWI
FAROE ISLANDS
RINKA
FINEST SALMON
CRAFTED BY NATURE
RINKA.FO